| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 691 |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato:** 30. august 2018 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr: 179/18-197/18**

**FUNDARLEIÐARI:**
Annika Jacobina Olsen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Helena á Dam Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Gunvør Balle
Turið Horn
Bergun Kass
Heðin Mortensen
Kaj Leo Holm Johannesen

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Barbara Vang
David Andrésen
Jóan Petur Hentze
Eilen Anthoniussen

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Bjørgfríð Ludvig

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 692 | |
| | Formansins merki: | |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 179/18 | 18/03142-1 | Annfinn Brekkstein farloyvi frá býráðnum | 693 |
| 180/18 | 18/00020-1 | Mál beind í nevndir 2018 | 694 |
| 181/18 | 18/02803-1 | Søla av óbygdum kommunalum grundstykki. Matr.nr. 135ll, Hoyvík. | 695 |
| 182/18 | 16/03784-17 | Keyp av óvbygdum grundøki matr. nr. 138bs, Hoyvík. | 697 |
| 183/18 | 18/02923-2 | Søla matr.nr. 22x, Kaldbak. Við Krossá 12. | 699 |
| 184/18 | 18/02924-4 | Matr.nr. 138de, Hoyvík. Karlamagnussarbreyt. | 701 |
| 185/18 | 18/02215-2 | Søla av grundstykki á Kerjagøtu | 703 |
| 186/18 | 16/04642-1 | Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár | 705 |
| 187/18 | 17/02942-1 | Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði | 707 |
| 188/18 | 18/00940-2 | Barnabati : Viðvíkjandi stovnan av mentorordning í Tórshavnar kommunu | 712 |
| 189/18 | 18/00041-1 | Avtala við VEKS um búpláss | 715 |
| 190/18 | 18/02825-2 | Undirskrivaður sáttmáli millum Mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um leigu av kjallarahæddini á matr. nr. 1035h, Tórshavn | 719 |
| 191/18 | 16/04614-1 | Val av 2 limum í Minnisgrunn Sonnu av Skarði | 722 |
| 192/18 | 17/03897-1 | Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum | 723 |
| 193/18 | 14/03118-2 | Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili | 735 |
| 194/18 | 18/00908-5 | Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi | 747 |
| 195/18 | 17/00946-3 | Kiosk Náttaravnurin í Steinatúni. | 750 |
| 196/18 | 14/03408-18 | Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064) | 754 |
| 197/18 | 18/00018-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018 | 769 |

## *179/18 Annfinn Brekkstein farloyvi frá býráðnum*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 179/18 | 18/03142-1 |

**Málslýsing:**
Annfinn Brekkstein hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Kaj Leo Holm Johannesen, eru loknar.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar**.**

## 180/18 Mál beind í nevndir 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 7/18 | 18/00020-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 30/18 | 18/00020-1 |
| 3 Býráðsfundur | 22.03.2018 | 50/18 | 18/00020-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 70/18 | 18/00020-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 110/18 | 18/00020-1 |
| 6 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 138/18 | 18/00020-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 180/18 | 18/00020-1 |

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 22. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

| | Býráðsfundur<br>30. august 2018 | Blað nr.: 695<br><br>Formansins merki: |
|---|---|---|

# 181/18 Søla av óbygdum kommunalum grundstykki. Matr.nr. 135ll, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 222/18 | 18/02803-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 181/18 | 18/02803-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur.**
Óbygt kommunalt sethúsa grundstykkið. Addr. Karlotsgøta 2, 188 Hoyvík.
Grundstykkið er 408m2, og er ikki útgrivið.

Talan er um grundstykkið í “gamlari “ kommunalari útstykking,Hoyvíkshagin suður.

Grundstykkið er óbygt, og hevur kommunan keypt grundstykkið aftur frá verandi eigara.

Grundstykkið hevur síðani staðið á sølulista hjá meklara.
Hægsta boð er kr. 1.000.000,- og kom onki mótboð.

Ognarmeklarin hevur tikið grundstykkið av aftur sølulista, til avgerð liggur í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl. Kortskjal. Teldubræv frá meklara.**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í Stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundstykkið fyri hægsta boð 1. mill. kr.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

# 182/18 Keyp av óvbygdum grundøki matr. nr. 138bs, Hoyvík.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 8/18 | 16/03784-17 |
| 2 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 10/18 | 16/03784-17 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 221/18 | 16/03784-17 |
| 4 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 182/18 | 16/03784-17 |

**Upprunin til málið:** Talan er um eitt sethúsagrundstykki Við Myllutjørn í Hoyvík.

Eigarin keypti grundstykkið í november 2012, og liggur grundstykkið óbygt.

Kommunan hevur rykt uppá byggifreist, og er málið síðani handa Advokatfelagnum, at innheinta.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí omanfyri. Eigarar ynskja nú at lata grundstykkið innaftur, og hava undirskrivað skeytið, har kommunan yvirtekur grundstykkið aftur fyri kr. 451.681,00 sum er upprunaprísurin. Peningurin skal flytast á klientkonto hjá Advokatfelagnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum. Ongir.**

**Umhvørvisárin. Ongi.**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl.** Skeyti. Rykkjarar.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☒** **Nei ☐**

**Tilmæli:**

Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla til at keypa grundstykkið aftur fyri kr. 451.681,00

Tá ið skeytið er tinglýst til kommununa, verður grundstykkið selt í fríðari sølu hjá ognarmeklara.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Grundstykkið hevur ligið á sølulista hjá ognarmeklara.

Hægsta boð er kr. 710.000,00 og kom onki mótboð.

**Tilmæli.**

Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini mæla til at selja grundstykkið fyri innkomið boð kr. 710.000,00

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtylt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

# 183/18 Søla matr.nr. 22x, Kaldbak. Við Krossá 12.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 224/18 | 18/02923-2 |
| 2 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 183/18 | 18/02923-2 |

**Upprunin til málið:** Gomul útstykking í Kaldbak.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Sí mál 14/01389. Býráðið samtykti 14.12.2017 at lýsa grundstykkini í Kaldbak til sølu til mettan marknaðarprís.

Matr.nr. 22x, sum er til víddar 500m2, varð mett til kr. 205.750,00

Grundstykkið hevur staðið á sølulista hjá Meklaranum BetriHeim.

Boð áljóðandi kr. 200.000,00 er innkomið, og onki mótboð. Meklarin hevur fyribils tikið grundstykkið av sølulista, og bíðar eftir at kommunan tekur avgerð í málinum.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini**. Sí omanfyri.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.** Sí omanfyri.

**Møgulig frávik/léttar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum).** Ongar.

**Skjøl.** Teldubræv frá meklara. Kortskjal útstykking. Býráðssamtykt skjal 14/01389-37

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 700 |
| | Formansins merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni mæla til at selja grundsstykkið fyri innkomið boð kr. 200.000,00

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtyt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

# 184/18 Matr.nr. 138de, Hoyvík. Karlamagnussarbreyt.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 223/18 | 18/02924-4 |
| 2 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 184/18 | 18/02924-4 |

**Upprunin til málið:** Umsókn frá verandi eigara.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

Verandi eigari Sp/f Akraberg, selur óbygda grundstykkið matr.nr. 138de, Hoyvík.Karlamagnussarbreyt til nýtt Sp/f 01.08.18.

Grundstykkið verður selt millum feløgini fyri somu upphædd sum kommunan seldi grundstykkið fyri til Sp/f Akraberg t.v.s. kr. 1.053.909,07

Ognarviðurskiftini verða síðani. Sp/f Akraberg ( 50% ) og Sp/f 11.11.16 ( 50% )

Nýggja felagið Sp/f 01.08.18 hevur ætlanir um at byggja íbúðarbygning við 12 íbúðum á grundstykkið.

Talan er um íbúðir sum verða frámatrikuleraðar í íbúðarlutir og sum verða seldar.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/læ ttar frá ásetingum.** Frávik frá Skeytisáseting.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl.** Kortskjal. Verandi skeyti. Uppskot til víðarisøluskeyti.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☒**

**Tilmæli:** Kommunustjórin og leiðarin í stjórnarskrivstovuni, mæla til at góðkenna víðarisølu av matr.nr. 138de, Hoyvík, sí uppskot til skeyti, skjal 18/02924-5

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

Bjørghild Djurhuus luttók ikki í viðgerðini av málinum.

# 185/18 Søla av grundstykki á Kerjagøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 167/18 | 18/02215-2 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 141/18 | 18/02215-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.08.2018 | 244/18 | 18/02215-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 185/18 | 18/02215-2 |

**Upprunin til málið:** Kommunan hevur 4 grundstykkir í eini útstykking á Dánjalstrøð á sølulista hjá ognarmeklara. Grundstykkini verða latin við vegatkomu og tekniskum innleggingum, men óutgrivin.

**Lýsing av málinum – samandráttur.** Grundstykkini hava staðið á sølulista hjá ognarmeklara. Prísuppskot kr. 1,1 mill. kr. Tað hevur verið ein avbjóðing í sølutilgongdini, at kommunan hevði ætlanir um at fíggja vegin við sølu av hesum 4 grundstykkjunum, áðrenn møguligur sáttmálið uppá útstykkingarveg var undirskrivaður.

Seinni hevur býráðið so samtykt, at fara undir vegagerðina. Mett tíðarætlan uml. 7. mðr. Harumframt ganga so nakrir mánaðar, eftir hetta at fáa grundstykkini og vegin við parkeringsøkjum og felagsøkjum frámatrikulerað. Leystliga mett ganga helst eini 10 mánaðar til endaliga skeytið kann skrivast og tinglýsast.

Meklarin upplýsir, at síðstu tíðina, hava verið fleiri fyrispurningar, og at ein keypari er komin við boðskjali og bankaváttan á kr. 1.1 mill. kr. fyri stykkið nr. 1.

Meklarin hevur fyribils skrivað viðkomandi keypara stykkið upp til stykkið nr. 1 og verður hetta stykkið tí tikið av sølulista.

**Lógir, ásetingar o.a.** Kommunustýrislógin.

**Upplýsingar frá umsitingini.**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið.**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum.** Ongir.

**Umhvørvisárin.** Ongi.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**Ongar.

**Skjøl**. Sølutilfarð sum liggur hjá meklara.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|

| | | | | |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☒ **Nei** ☐

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni, mæla til at skriva undir eina treytaða keypsavtalu áljóðandi kr. 1.1 mill. kr. við viðkomandi keypara, sum verður tíðaravmarkað til 1 ár.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**

Meklarin hevur boðað frá, at keyparar eru til øll grundstykkini. Søluprísur pr. Stykkið kr. 1,1 mill. kr.

Meklarin hevur fyribils tikið stykkini aftur av sølulista.

Býráðið hevur samtykt at skriva skriva undir treytaða keypsavtalu áljóðandi 1,1 mill. kr. fyri stykkið nr. 1. Treytaða keypsavtalan verður avmarkað til 1 ár.

**Tilmæli:**

Nú keyparar eisini eru til hini 3. stykkini í útstykkingini, t.v.s. stykkið nr. 3 – 5 og 7, mælir kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni til at skriva undir treytaðar keypsavtalur við hesar kepararnar áljóðandi 1,1 mill. kr. pr. stykkið. Treytaðu keypsavtalurnar verða galdandi í 1 ár.

**Fíggjarnevndin 29. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | | Blað nr.: 705 |
| | | Formansins merki: |

# 186/18 Val av hegn- og vatnsýnisnevnd fyri 4 ár

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 27/16 | 16/04642-1 |
| 2 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 142/18 | 16/04642-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 186/18 | 16/04642-1 |

**Málslýsing:**
Sbrt. § 44 í lóg nr. 171 "Om hegn og markfred" frá 18. mai 1937 og § 15 í lóg nr. 169 "Om benyttelse af indsøer og vandløb" frá 18. mai 1937 velur býráðið 3 hegn- og vatnsýnismenn.
Samstundis verða valdir 3 tiltakslimir.

Í 2012 vóru hesi vald: Jan Poulsen, Torvald Lutzen, Just Rubeksen, Eddie Joensen, Jákup av Skarði, Anna Rubeksen og Snorri á Bøgarði. Tiltakslimir vóru: Karlon Winther, Heri Ó. Dam og Hans Silvan Johannesen.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja 3 limir í nevndina, umframt 3 tiltakslimir.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Vald vórðu

| Fastir limir | Varalimir |
|---|---|
| Hans Silvan Johannesen | Vivi Kirke Davidsen |
| Jákup av Skarði | Leivur Hansen |
| Edith Vang | Jóannes Guttesen |
| Torvald Lützen | Anna Rubeksen |
| Heri Ó Dam | Karlon Winther |

**Ískoyti:**
Jákup av Skarði hevur boðað frá, at hann sigur seg úr Hegn- og vatnsýnisnevndini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggjan lim í nevndina.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Tikið til eftirtektar at velja Kára Mortensen sum nýggjan lim í nevndina.

**Ískoyti:**
Hans Sylvan Johannesen hevur boðað frá, at hann sigur seg úr Hegn- og vatnsýnisnevndini.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 706 |
| | Formansins merki: |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggjan lim í nevndina.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at velja Vivi Kirke Davidsen sum fastan lim í nevndina og Fróða Olsen sum tiltakslim**.**

## 187/18 Út- og umbygging av gamla Tjarnargarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 11.09.2017 | 16/17 | 17/02942-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.09.2017 | 196/17 | 17/02942-1 |
| 3 Býráðsfundur | 28.09.2017 | 206/17 | 17/02942-1 |
| 4 Eldranevndin | 15.01.2018 | 39/18 | 17/02942-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 17.01.2018 | 11/18 | 17/02942-1 |
| 6 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 15/18 | 17/02942-1 |
| 7 Eldranevndin | 21.08.2018 | 7/18 | 17/02942-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 231/18 | 17/02942-1 |
| 9 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 187/18 | 17/02942-1 |

**Málslýsing:**
Tann parturin av Tjarnargarði, sum er gamla Marinustøðin, tørvar stórar ábøtur. Bygningurin er upprunaliga frá 1960, men varð umbygdur og tikin í nýtslu sum røktarheim í 2004, seinni kom eisini dagtilhald.

Sbrt støðulýsing, ið gjørd varð í sambandi við yvirtøkuna av eldraøkinum, skulu brunaviðurskifti betrast munandi svarandi til uml. kr. 7 mió. Harumframt eru lekar, tak og arbeiðsumhvørvi, sum skal skiftast/betrast. Alt í alt verða hesar bygningsdagføringar mettar at kosta uml. kr. 18,5 mió.

Hetta er tí at meta sum sjálvstøðug íløguverkætlan.

Húsaumsitingin og Heilsu- og umsorganartænastan hava tí eisini umrøtt, hvørjir møguleikar eru at gagnnýta bygninginum meira í mun til tørvin hjá heilsu- og umsorganartænastuni at økja um tænastur og tilboð, serliga í mun til at fáa brúkt loftið.

Demensdepil
Í løtuni eru 10 búpláss til borgarar við demenssjúku í Kristianslon og dagtilhald er í Tjarnarlon.

Uppskotið er, at Tjarnarlon verður umbygd til 8 umlættingpláss ætlað borgarum við demenssjúku, og at loftið verður útbygt við kvistum soleiðis, at har verða høli bæði fyri dagtilhaldinum og til venjingar v.m. hjá ergoterapeutum og fysioterapeutum, sum í dag mangla slíkar umstøður. Eisini verða gjørdar aðrar broytingar, sum antin hava við bygningskrøv at gera ella við betri funktionalietet í mun til virksemið.

Eitt skitsuprojekt er gjørt, sum lýsir hesar møguleikar, eins og at kravdu bygningsdagføringarnar eru tiknar við. Harumframt fyriliggur ein kostnaðarmeting, sí hjálagt hefti.

Hugsanin við at gera ein demensdepil er, at borgarar við demenssjúku sum verða knýttir til depilin, fáa tilboð sum er nøktar teirra tørvi á einum stað. Tað vil siga at ein borgari kann fáa dagtilhald, kvøldtilhald, vikuskiftistilboð, umlætting, venjingar og búpláss á sama stað. Hetta er mett at vera ein fyrimunur fyri borgarar við demens, tí umhvørvi og starvsfólkini eru kend og skapar tað tryggleika fyri tann demesrakta.

Hesin demensdepil hevur tann fyrimun, at tilboðið til tann demenssjúka kann skipast munandi meira fleksibult alt eftir sjúkugongdini, har byrjast kann við tilboði um dagtilhald fyri síðan at seta hetta saman við tilboði um umlætting styttri og longri, fyri síðan seinni at fáa fast búpláss alt í sama bygningi.

Eisini verður mett, at hetta fakliga og rakstrarliga hevur fyrimunir. Fakliga gevur hetta fleiri fyrimunir. Tann demensrakti verður í kendum umhvørvi og starvsfólkini á deplinum kenna tann demensrakta, tað verður kontinuitetur í gongdini hjá borgaranum og harvið økist tryggleikin hjá tí demensrakta, sum hevur stóran týdning. Tey avvarðandi hava ikki sum í dag, fleiri stovnar og starvsfólk at fyrihalda seg til, tí borgarin fer at fáa øll tilboð á sama stað. Tað hevur sínar fyrimunir at vitanin verður savna á sama stað, hetta bæði tann fakliga vitanin, men eisini vitanin um borgaran. Tað er kent, at tá borgarar skifta millum stovnar detta týðandi upplýsingar um borgaran burtur. Tað verður væl lættari og skjótari at seta fyribyrgjandi tiltøk í verk, tí øll tilboðini hanga saman.

Tað er bráðfeingis tørvur á fleiri umlættingarplássum, eisini innan demens. Í mun til at byggja nýtt sjálvstøðugt, gevur henda loysnin rakstrarligar fyrimunir. Sjálvsagt krevur tað fleiri starvsfólk, tá 8 nýggj pláss verða gjørd, men í hesum føri ber til at samansjóða við verandi starvsfólkahóp á Kristianslon og dagtilhaldinum. Hetta ger, at økingin av starvsfólki verður minni enn um sjálvstøðug eind bleiv bygd. Økingin av starvsfólki svara til knapt 6 ársverk. Um hesi 8 plássini vóru bygd fyri seg, vildi tað verið neyðugt at sett áleið 8 ársverk. Umframt at hetta er ein fíggjarligur fyrimunur, er tað eisini ein fyrimunur í  og við, at tað er avbjóðandi við rekruttering.

Kostnaðarmeting fyri samlaðu verkætlanina er kr. 23,8 mió.

<u>Tilgongd víðari</u>
Henda ætlan við Tjarnargarði hongur saman við heildarætlanini um eldrabústaðir, sí mál 17/00586.

Mett verður, at byggitíð fyri hetta er uml. 12-14 mánaðir. Projektering og útboð tekur uml. 4-6 mánaðir. Í mun til hesa bygging verður mett skilabest at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku. Uppskot til tíðarætlan kann samsvarandi hesum síggja soleiðis út:

- Prosjektering byrjar 01. okt ´17
- Skipanaruppskot liðugt ultimo okt ´17
- Prosjektuppskot liðugt ultimo des ´17
- Myndugleikaprosjekt liðugt medio jan ´17
- Høvuðsprosjekt liðugt ultimo feb ´18
- Útboðstíðarskeið liðugt medio apríl ´18
- Avgerð um bygging og sáttmálar liðugt utimo apríl ´18
- Bygging byrjar 01. mai ´18
- Byggitíðarskeið 12-14 mðr
- Bygging takast endaligt í brúk juli/august ´19

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at taka undir við verkætlanini sum lýst omanfyri, harundir at geva umsitingini heimild at gera ráðgevarasáttmála um prosjektering og útboð fyri í mesta lagi kr. 1 mió at játta av tøkum løgukarmi 2775 eldraøkt.

**Eldranevndin 11. september 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. september 2017:** Samtykt at taka undir við eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 28. september 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Samráðing hevur verið um ráðgevarasáttmála um prosjektering. Samlaður kostnaður fyri prosjekteringsleiðslu, prosjektering, byggileiðslu og fakeftirlit er kr. 3.100.000.

Á løgukontuni L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði, eru tøkar kr. 1 mió. Játtast kunnu 2,1 mió av tøka løguarminum 2775 Eldrarøkt L00001.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at játta kr. 2,1 mió av løgukarmi 2775 Eldrarøkt L00001 til løgukontu L27010 Út- og umbygging av Tjarnargarði.

**Eldranevndin 15. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 17. januar 2018:** Samtykt at taka undir við Eldranevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í samband við umbygging av Tjarnargarði eru komin fram viðurskifti sum gera at kostnaðarmetingin hækkar.

Stórt ynski hevur í nógv ár verið um at byggja báðar bygningarnar saman við einum glasmillumbygningi. Við at binda bygningarnar saman kann fáast meira skynsamur rakstur tí til ber hjá starvsfólkinum at ganga inni tí bygningurin er sum ein. Mett verður at glas millumbygningur kostar 315.500 kr. at gera.

Búfólkini á Tjarnargarði fáa mat av Lágargarði, av tí at køksviðurskiftini á Tjarnargarði ikki loyva at matur í stórum mongdum verður gjørdur á staðnum. Hetta passar illa við hugburðin um at røktarheimini í Tórshavnar kommunu skulu vera heimlig. Køkur skal gerast á

Tjarnargarði í samband við umbyggingina, tó er bert hugsa at køkurin skal virka á sama hátt sum higartil. Umsitingin hevur kannað møguleikan fyri at gera køkin til stórkøk og sær hetta út til at bera til. Meirkostnaðurin fyri at gera køkin til stórkøk sum kann gera allan matin á staðnum er 350.000 kr.

Dagtilhaldi skal flytast uppá lofti. Starvsfólkini hava viðmerkt at hetta kann verða óheppi í mun til at trupult verður hjá borgarunum at fara út um sjálvir. Starvsfólkini meta at um ein altan er í samband við dagtilhaldi kunnu borgararnir sjálvir fara at fáa sær fríska luft og vildi tað avgjørt veri ein góð loysn. Byggideildin metir somuleiðis at ein altan út frá dagtilhaldinum, er ein góð loysn, eisini í mun til brandtrygd. Meirkostnaður fyri at gera altan er 250.000 kr.

Mett verður at kostnaður fyri eyka projektering av omanfyri nevnda er 100.000 kr.

Omanfyri nevnda eru stórar betranir av umbyggingini og av bygninginum.

Byggi- og býarskipanarnevndin gav ikki loyvi at gera rúmini til umlætting soleiðis sum upprunaliga ætla, tí mett var at tey vóru ov lítil og at tað ikki var wc/baðirúm til hvør kamar. Í tilmælinum hjá virkandi tekniska stjóra og virkandi leiðara á byggideildini verður tilmælt at geva byggiloyvi við teirri treyt, at verkætlanin verður endurskoða og dagførd samsvarandi dagsins normum fyri innrætting av slíkum stovnum og annars við teimum treytum sum umsitingin setur. Byggi- og býarskipanarnevndin samtykti 18 juni 2018 at taka undir við tilmælinum.

Hetta er tikið til eftirtektar og nýtt uppskot er gjørt sum tryggjar baðirúm/wc til hvørt kamar, umframt at hvørt kamar nú er størri enn upprunaliga ætla.
Henda broyting hevur við sær, at umframt at flyta okkurt starvsfólkarúm uppá so er tali av nýggjum búrúmum nú 7 og ikki 8 sum upprunaliga ætla.

Hinvegin so eru rúmini størri og tað vera gjørd baðirúm/wc til hvørt rúm, sum sjálvandi er ein betran í mun til at tvey búrúm deila baðirúm/wc.

Fyri at gera búrúm størri og gera baðirúm/wc til hvør kamar metir TK at meirkostnaðurin er 350.000 kr. (kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni)

Meirkostnaður í sambandi við umbygging av Tjarnargarði er sostatt mettur at verða:

| | |
|---|---|
| Glas millumbygningur | 315.500,00 |
| Stór køkur | 350.000,00 |
| Altan | 250.000,00 |
| Eyka projektering, fyri omanfyri nevnda | 100.000,00 |
| Størri búrúm (serliga er tað baðirúm sum skapa meirkostna) | 350.000,00 (hetta er ein meting frá TK, ein kostnaðarmeting kemur frá Kontrast seinni) |
| samanlagt | 1.365.500,00 kr. u/MVG |
| | 1.450.843,75 kr. v/6,25% MVG |

Kostnaðarmetingin av umbyggingini av Tjarnargarði sum bleiv gjørd var 23,8 mio. kr. Um omanfyrinevndu tillagingar skulu gerast heldur henda kostnaðarmeting ikki.

Við tillagingunum verður nýggja kostnaðarmetingin samla 25,3 mio kr.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og deildarleiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka undir við, at omanfyrinevndu broytingar verða gjørdar í samband við umbyggingina av Tjarnargarði og at játta 1.5 mio kr. til endamáli.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við broytingunum og at játtanin verður fingin til vega á íløguætlanini og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 712 |
| | Formansins merki: |

# 188/18 Barnabati : Viðvíkjandi stovnan av mentorordning í Tórshavnar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin | 07.05.2018 | 22/18 | 18/00940-2 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 21.08.2018 | 31/18 | 18/00940-2 |
| 3 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 230/18 | 18/00940-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 188/18 | 18/00940-2 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Barnabati hevur vent sær til kommununa við uppskoti um samstarv og fígging viðvíkjandi mentorskipan fyri ung 13-17 ár í Tórshavnar kommunu.

Uppskotið um mentorskipan í Tórshavnar kommunu hevur svenska fyrimynd og byggir í største mun á sjálvboðið arbeiði. Barnabati stendur fyri samskipanini av mentorskipanini, stendur fyri rektruttering og útbúgving av mentorum, "matchar" mentor og tann unga v.m. Mettur kostnaðarkarmur uml. 0,5 mió, tá er íroknað kunningarátøk v.m.

Umsitingin hevur umrøtt uppskotið saman við Barnabata. Metingin er, at mentorskipanin er viðkomandi fyribyrgjandi og mennandi tilboð og átak fyri ung, ið kunnu hava ymsar trupulleikar og ampar at dragast við, og sum við vegleiðing og hjálp frá sjálvbodnum vaksnum fólki, ið hevur fakligt grundarlag og er skúlað sum mentor, kunnu koma víðari á góðan hátt.
Fyri Tórshavnar kommunu vilja skúlar, ungdómsklubbar, barnavernd, SSP, frítíðarfelagsskapir v.m. verða sjálvsagdir áhugapartar í skipanini.

Umboð fyri Barnabata leggja uppskotið fram.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☐ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at viðgera uppskotið við atliti til at umsitingin kemur við endaligum tilmæli til komandi nevndarfund.

**Trivnaðarnevndin 07. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtykt omanfyri. Umsitingin hevur nú gjørt uppskot til samstarvsavtalu við Barnabata um mentorskipan fyri ung í Tórshavnar kommunu, og er uppskotið eisini lagt fyri Barnabata.

Sbrt. uppskotinum er talan um tvey ára royndarverkætlan, ið skal eftirmetast í minsta lagi árliga.

Yvirskipaða endamálið við mentorskipanini er at veita eitt upplýsandi, fyribyrgjandi og mennandi tilboð til børn og ung í aldrinum 12-18 ár, ið kunnu hava ymsar trupulleikar og sálarligar ampar at dragast við, og sum við vegleiðing frá sjálvbodnum mentorum, ið eru skúlað til endamálið, kunnu vera við til at stimbra og menna sjálvsvirði og trivnað hins unga.

Sbrt. avtaluni stendur Barnabati fyri mentorskipanini, harundir samskipan, at útvega og útbúgva mentorar, kunning, eftirmeting v.m. Kommunan letur fígging, tó treytað av játtan í viðkomandi fíggjarætlan hjá kommununi, og skal sjálvstøðugur roknskapur gerast fyri mentorskipanina.

Samstarvið millum kommununa og Barnabata um mentorskipanina verður skipað við stýrisbólki, ið m.a. skal útgreina og dagføra felags mál fyri mentoskipanina, ummæla uppskot

til fíggjarætlan og tryggja, at mentorskipanin hevur neyðugt fakligt grundarlag og verður áhaldandi eftirmett.

Skotið er upp, at stýrisbólkurin hevur fimm limir, har trivnaðarnevndin vegna kommununa tilnevnir tríggjar limir og Barnabati tveir. Stýrisbólkurin hevur fund í minsta lagi hvønn ársfjórðing.

Royndarverkætlanin er sett at enda 31. desember 2020, har samstarvspartarnir við støði í eftirmeting samstundis skulu taka endaliga støðu til, um samstarvið um mentorskipanina skal halda fram ella skal halda uppat.

Fígging í 2018:
Verður samstarvsavtala samtykt her í august, kann mentorskipanin byrja í september/oktober. Fíggjartørvur verður tá einamest til byrjanarútreiðslur, harundir kunningarátøk, skeið fyri mentorum v.m. Mett verður, at játtast kunnu kr. 250.000 til endamálið, har møguliga óbrúkt játtan kann ganga inn í virksemið í 2019.

Stýrisbólkurin skal lata kommununi uppskot til fíggjarætlan fyri 2019. Mett verður, at játtanartørvurin fyri eitt ár er umleið kr. 500-600.000 alt eftir vav av virkseminum.

Kommunal umboð í stýrisbólk:
Trivnaðarfyrisitingin mælir til, at hesi umboða kommununa í stýrisbólkinum: Tine Lyager, SSP-samskipari á Sosialu deild, Salua Manai, leiðari á Margarinfabrikkini, og Katrin Ellingsgaard, Mentamáladeildin.

§ 3, stk. 3 í leiðreglunum fyri kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið, hiðani fíggingin til mentorskipanina ætlast verða játtað, ásetir, at býráðið skal góðkenna játtan og samstarvsavtalu sum hesa.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og sosialdeildarleiðarin mæla til at samtykkja uppskotið til samstarvsavtalu við Barnabata um royndarverkætlan við mentorskipan fyri ung, og í hesum sambandi játta kr. 250.000 í inniverandi fíggjarárið av kontu 2460 Stuðul og verkætlanir innan almanna- og heilsuøkið. Málið verður beint í býráðið um fíggjarnevndina.

Harumframt mælir trivnaðarstjórin, sosialdeildarleiðarin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og mentamálaleiðarin til at tilnevna hesi starvsfólk sum umboð í stýrisbólkin:
- Tine Lyager, SSP-samskipari
- Salua Manai, leiðari í Margarinfabrikkini
- Katrin Ellingsgaard, Mentamáladeildin

**Trivnaðarnevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

# 189/18 Avtala við VEKS um búpláss

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Eldranevndin | 08.01.2018 | 36/18 | 18/00041-1 |
| 2 Eldranevndin | 23.02.2018 | 41/18 | 18/00041-1 |
| 3 Eldranevndin | 21.08.2018 | 5/18 | 18/00041-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 233/18 | 18/00041-1 |
| 5 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 189/18 | 18/00041-1 |

**Upprunin til málið:**
Av tíð at bíðitíð er til umlætting og búpláss á røktarheimi í Tórshavnar kommunu, er politiskt ynski um at leiga pláss frá øðrum eldrasamstørvum.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Fyrisitingin hevur havt samband við øll kommunalu eldrasamstørvini og er tað bert VEKS, sum hevur tøk pláss, sum talan kann verða um at leiga.

Í tí sambandi hevur samskifti verið við VEKS um, hvussu farast skal fram og undir hvørjum treytum pláss kunnu leigast. Møguleiki er at leiga 2 pláss á sambýlinum á Eiði (Korndalsbýlinum), 3 pláss á Grønanesi í Vestmanna og 4 pláss á Mørkini í Streymnesi.

Í samskiftinum eru viðurskifti, sum nærri støða skal takast til. Lutvíst er døgnprísurin pr. borgara hægri enn samsvarandi í Tórshavnar kommunu og við lægri normering enn í Tórshavnar kommunu. Harumframt eru krøv um hægri gjald aftrat døgnprísinum, um borgarin hevur tørv á meira enn "vanligan tørv", eitt nú borgarar, sum hava tørv á meira enn einum starvsfólki til røkt v.m. Sí annars hjálagt skjal um hesi viðurskifti.

Í Tórshavnar kommunu er fyrst og fremst tørvur á umlættingarplássum til "serliga røktartørvandi borgarar" umframt borgarar við demenssjúku. Tekur kommunan av tilboðnum, so kann væntast, at døgnprísurin í fleiri førum fer upp um tað, sum VEKS metir vera hóskandi fyri borgara við vanligum tørvi. Hetta ger tað trupult at meta um samlaða kostnaðin.

Um talan verður um at leiga pláss frá VEKS verður tí mett týdningarmikið, at Heilsu- og umsorganartænastan varveitir øll umlættinagarplássini, sum eru í kommununi í løtuni. Umlættingarheimið er ikki egnað til at taka teir mest røktartørvandi borgararnar til umlætting, og hesir fara tí á tey 4 umlættingarplássini, sum eru á ávíkavist Boðanesheiminum og á Lágargarði.

Í fíggjarætlanini fyri 2018 eru játtaðar kr. 4 mió til rakstur av nýggjum umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepli. Hesin depil stendur neyvan klárur í ár. Møguleiki er tí at játta henda pening til at leiga pláss frá øðrum samstørvum í eitt avmarkað tíðarskeið bert til umlætting, so kommunan ikki er bundin til pláss í øðrum samstørvum, tá pláss aftur eru tøk í Heilsu- og umsorganartænastuni.

Tilboðið frá VEKS um 9 pláss eru býtt út á tríggjar stovnar í trimum bygdum í Norðstreymoy/Eysturoy. Omanfyri nevnda fígging røkkur í besta føri til 4 pláss í eitt ár. Mett verður óheppið at leiga pláss í ymsum røktarheimum, tí tað krevur nógva umsiting og nógv samskifti við fleiri partar.

Um peningurin skal røkka til alt 2018, so ber bert til at leiga 4 pláss. Hetta kundi passandi verið á Mørkini, har til ber at leiga 4 pláss samlað. At leiga 4 pláss til umlætting fer at geva ein góðan skáa í bíðilistanum til røktarheimspláss, og fer eisini at lætta um í heimatænastuni soleiðis, at tað ikki verður bíðitíð til heimatænastu. Somuleiðis er hugsanin, at liðugt viðgjørdir sjúklingar skjótari kunnu útskrivast av sjúkrahúsinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingar avleiðingar | x | | | |
| Unhvørvis avleiðingar | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og Heilsu- og umsorganarstjórin mæla til at geva fyrisitingini heimild at gera avtalu við VEKS um at leiga fýra umlættingarpláss á Mørkini, og at játtan kr. 4 mió, ið sett varð av til rakstur av umlættingar- og samdøgursrehabiliteringsdepli, verður brúktur til endamálið.

**Eldranevndin 08. januar 2018:** Samtykt at arbeiða víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Heilsu- og umsorganartænastan og VEKS hava í eina tíð arbeitt við innihaldinum í einari samstarvsavtalu, har H og U leigar 4 pláss til umlætting frá VEKS, fram til 31.12.18.

Partarnir eru nú samdir um orðingarnar í samstarvsavtaluni.

Greitt veður frá gongdini og frá innhaldinum í samstarvsavtaluni.

**Eldranevndin 23. februar 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avtala við VEKS um búpláss.

Heilsu- og umsorganartænstan hevur síðan í mars í 2018 leigað 4 búpláss frá VEKS sum verða nýtt til umlætting til borgarar í Tórshavnar kommunu. Hendan avtala hevur hepnast væl, samstarvið hevur verið gott og afturmeldingarnar frá borgarunum eru fyri tað mesta jaligar. Tó eru onkur sum hevur takkað nei til tilboð um umlætting á Mørkini, tí tað er ov langt vekk.

Sambært avtaluni við VEKS, leigar TK 4 búrúm sum verða nýtt til umlættingarpláss, hetta til 31.12.18. Kostnaðurin er 1990 kr. pr. døgn. Sambært avtaluni skal TK boða VEKS frá í seinasta lagið í okt. 2018 um ynski er um framhaldandi at leiga pláss eftir 31.12.18.

Leiguavtala bleiv gjørd meðan bíðað var eftir at Umlættingar- og rehabiliteringdepilin, sum er í umbúna at byggjast, verður liðugur. Umlættingar- og rehabiliteringsdepilin verður í løtuni projekteraður og væntast kann helst ikki, at hann stendur klárur til nýtslu í 2019. Spurningurin er tí, um haldast skal fram við at leiga pláss á Mørkini ella møguliga frá øðrum samstørvum, fyri at taka broddin av tørvinum á umlættingarplássum, sum er í Tórshavnar kommunu.

Umsitingin meti,r at tørvur er á plássunum og metir tað skilagott at hava møguleikan at leiga pláss, antin framhaldandi frá VEKS ella frá øðrum samstørvum. Í verandi løtu eru tó ikki tøk pláss hjá øðrum samstørvum enn hjá VEKS.

Ongin fígging er tøk til endamálið um H og U framhaldandi skal leiga pláss frá øðrum kommunum. Neyðugt er tí at taka støðu til og játta pening á fíggjarlógini fyri 2019. 4 mio. kr. gevur møguleika fyri at leiga 5 pláss frá VEKS ella øðrum samstørvum, við tí kostnaði sum vit gjalda í dag fyri leiguplássini.

**Tilmæli:**
Heilsu- og umsorganarstjórin og eindarleiðslan í H og U mæla til at taka undir við at leiga pláss frá VEKS og/ella øðrum samstørvum og at játta 4. mio til endamáli á fíggjarætlanini fyri 2019.

**Eldranevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

# 190/18 Undirskrivaður sáttmáli millum Mentamálaráðið og Tórshavnar kommunu um leigu av kjallarahæddini á matr. nr. 1035h, Tórshavn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 229/18 | 18/02825-2 |
| 2 Mentamálanevndin | 21.08.2018 | 245/18 | 18/02825-2 |
| 3 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 190/18 | 18/02825-2 |

**Upprunin til málið:**
Kommununi er álagt at veita stovnspláss og námsfrøðilig tilboð til nøkur børn, ið hava serligan tørv.

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talan er um 3-5 børn, sum ganga í Skúlanum á Trøðni, men sum skulu hava frítíðarskúlatilboð. Kommunan hevur mett, at tørvurin hjá hesum bólki kemur ikki undir ásetingarnar í grein 5 í dagstovnalógini, sí niðanfyri, og hevur tí saman við Kommunufelagnum roynt málið sbrt. stk. 3 í nevndu lógargrein.

Avgerð er nú tikin um, at kommunan skal veita tilboðið.

Talan er um børn við fjøltáttaðum og umfevnandi menningaravbjóðingum, ið ikki kunnu vera saman við vanligum børnum á dagstovni. Talan er um børn við autismu. Tí er neyðugt at skipa serstakt tilboð til børnini, harundir hølisumstøðurnar og í mun til fakøki, har neyðugt er við settum ergoterapeuti. Væntast skal, at tilboðið verður í nøkur ár, tí yngri børn við somu menningarligu avbjóðingum fara at koma í skúlaaldur.

Gjørt er uppskot til leigusáttmála við Landsverk vegna Mentamálaráðið, sí hjålagt. Leigumálið eru høli í grannabygningi hjá Skúlanum á Trøðni, ið er fyrimunur fyri børnini. Kostnaður er 7.500 um mðr., ið svarar til kr. 1.000 m2 um árið. Leigumálið er í mesta lagi 5 ár við uppsagnarfreist uppá 4 mðr. Útleigari skiftur nøkur vindeygu og setur upp køk uppá egna rokning. Leigari rindar lutfalsligan part av el og hta.

Leiga og orkutreiðsla verður goldin av kontu 3215 Aðrar útreiðslur barnaansing.

Talan er ikki um at skipa nýggjan stovn, men verður eindin løgd undir Frítíðarskúlan í Kongagøtu konta 3130. Eindin er tó so lítil, at mett verður, at serstakur fíggjarleistur má gerast fyri raksturin, umframt at neyðugt verður at játta eykatímar av kontu 3212 Tímar vegna serligan tørv umleið 100 tímar eyka um vikuna.

Væntað verður ikki eykajáttanartørvur í inniverandi fíggjarári fyri kontu 3212, men verða hesar meirútreiðslur tiknar við í viðgerðina av fíggjarætlanaruppskotinum fyri 2019.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Dagstovnalógin grein 5 ásetir, at:

Børn við serligum tørvi hava rætt til tilboð um pláss á dagstovni og dagrøkt á jøvnum føti við onnur børn, sum búgva í kommununi, sambært § 3.

Stk. 2. Til børn við serligum tørvi verða veittar nøktandi hølisumstøður og námsfrøðilig tilboð.

Stk. 3. Í ivamálum um tilboð skal veitast sambært hesi lóg, skal málið ávísast víðari til Almannaverkið, ið tekur avgerð.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Mett verður, at við hesum avgerðum, har kommununi er álagt at skipa frítíðarskúlatilboð til henda bólk, er ósamsvar millum lóg og ábyrgd millum kommunurnar og landið (Almannaverkið). Málið eigur tí at verða lagt fyri Kommunufelagið at taka upp við landsstýrið til tess antin at halda seg til lógina ella at broyta lógina.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | x | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | x | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar: Ja ☒ Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini gera við hesum mentamálanevndina varuga við íkomna tørvin á serstøkum tilboði og mæla til at taka undir við, at tilboðið verður skipað sum eind undir Frítíðarskúlanum í Kongagøtu, og at lagt verður upp fyri nýggja fíggjartørvinum í fíggjarætlanin 2019. Útreiðslur í inniverandi ári verða fíggjaðar innan verandi játtanir.

Leigusáttmáli verður at beina í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 21. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Ískoyti**:
Umsitingin og Mentamálaráðið eru komin ásamt um uppskot til leigusáttmála at leggja fyri fíggjarnevndina. Sambært leigusáttmálanum leigar Tórshavnar kommuna 90 m2 á kjallarahæddini á matr. nr. 1035c á Frælsinum 30, Tórshavn fyri kr. 1000 pr. fermetur. Sáttmálin kann sigast upp við 4 mðr. freist frá báðum pørtum.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin á Stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til leigusáttmála.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri, ongari móti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turid Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass, Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Kaj Leo Holm Johannesen

Blankt atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

# 191/18 Val av 2 limum í Minnisgrunn Sonnu av Skarði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.12.2016 | 33/16 | 16/04614-1 |
| 2 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 191/18 | 16/04614-1 |

**Málslýsing:**
Sambært § 9 í reglugerðini fyri grunnin verður hann stýrdur av eini trímannanevnd, sum býráðið tilnevnir. Nevndin skipar seg sjálv. Býráðsformaðurin er føddur limur í nevndini. Hinir tveir stýrislimirnir verða tilnevndir fyri 4 ár í senn, og kunnu verða tilnevndir í mesta lagi 3 ferðir íalt.

Miðað verður ímóti, at teir báðir stýrislimirnir, sum býráðið tilnevnir, hava áhuga fyri og skil á handarbeiði. Teir nýtast ikki at vera býráðslimir.

Lutfalsval.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum at velja 2 limir í nevndina.

**Býráðsfundur 30. desember 2016:** Valdar vórðu Beinta Poulsen og Emly Djurhuus.

**Ískoyti:**
Emly Djurhuus hevur boðað frá, at hon sigur seg úr «minnisgrunn Sonnu av Skarði».

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til at velja nýggjan lim í nevndina fyri «minnisgrunn Sonnu av Skarði» .

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at velja Helenu Dam á Neystabø sum nýggjan lim í nevndina.

# 192/18 Bráðfeingistørvur á dagstovnaplássum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 29.11.2017 | 306/17 | 17/03897-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 10.01.2018 | 2/18 | 17/03897-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 22.01.2018 | 36/18 | 17/03897-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 23.01.2018 | 29/18 | 17/03897-1 |
| 5 Býráðsfundur | 25.01.2018 | 18/18 | 17/03897-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.04.2018 | 149/18 | 17/03897-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 24.04.2018 | 129/18 | 17/03897-1 |
| 8 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 83/18 | 17/03897-1 |
| 9 Mentamálanevndin | 06.06.2018 | 185/18 | 17/03897-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 177/18 | 17/03897-1 |
| 11 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 206/18 | 17/03897-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 204/18 | 17/03897-1 |
| 13 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 148/18 | 17/03897-1 |
| 14 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 192/18 | 17/03897-1 |

**Upprunin til málið:**

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Talið av nýføðingum í 2016 í Tórshavnar kommunu var 21% hægri enn í 2015 (52 børn). Undanfarnu 5-6 árini hevur kommunan tillagað plásskapasitetin til eitt alsamt lækkandi barnatal við tað, at dagrøktarskipanin og virksemið í dagstovninum Vípan eru niðurløgd hesi árini.

Nú er øvugta støða, og tí hevur umsitingin í 2016 og 2017 arbeitt við ymsum loysnum til tess at tryggja øllum pláss. Í vár eru fingin áleið 30 vøggustovupláss, í leigaðum hølum, og við at fremja eina útbygging í Býlingshúsinum undir Brúnni.

Vegna framhaldandi tørv, hevur umsitingin arbeitt við øðrum loysnum. Til skúlabyrjan 2017/18 er frítíðarskúlin í Hornabø fluttur til felagseind í Kongagøtu, (sí mál 17/00817 Felagseind við skúla og frítíðarskúla í Kongagøtu) fyri á tann hátt at fáa nýggja vøggustovu í Hornabø. Sostatt eru bæði í Kongagøtu og í Hornabø gjørdar tillagingar, soleiðis at tað passar til givna virksemið.

Umframt hesi átøk, hava dagstovnar í kommununi tillagað stovnsins virksemi til tess, at teir hava kunnað tikið fleiri vøggustovubørn inn so hvørt í 2017. Tískil eru so gott sum eingi tøk pláss á dagstovnunum í kommununi.

Snarskivan, ið umsitur plássávísingina, hevur nú boðað barna- og ungdómsdeildini frá, at tørvur er á dagstovnaplássum, bæði vøggustovu- og barnagarðsplássum frá ársskifti 2017/18 at rokna, hetta serliga vegna tilflyting til kommununa. Í løtuni standa 26 børn á bíðilista til vøggustovu, umframt 10 systkinapør, sum ynskja pláss á sama stovni. Harumframt koma fleiri á lista til eftirfylgjandi mánaðirnar.

Stovnarnir eru sum omanfyri nevnt longu fullir. Til tess at tryggja øllum á bíðilista pláss, verður neyðugt at útvega høli - skjótast. Veitir kommunan ikki pláss, kann Almannaverkið sbrt. forsorgarlógini veita foreldrum

fyribils hjálp vegna vantandi barnaansing, men álagt er kommununi at endurrinda landskassanum hesar útreiðslur. Fyri stakan forsyrgjara vil talan verða um kr. 15.674 um mðr.

Ynskiligt er, at loysnin, sum nú skal finnast, er ein varandi ella langtíðarloysn skilt á tann hátt, at tað er ikki haldbart at leiga og innrætta høli fyri stutta tíð í senn, so sum tað var gjørt í Kirkjustovu frá januar til juni 2017. Hetta er kostnaðarmikið, og haraftrat er torført at fáa starvsfólk til dagstovnaøkið yvirhøvur og uppaftur torførari til eitt so stutt tíðarskeið.

Stutttíðarloysnir hava eisini tann vansa, at vøggustovubørn skulu flyta umhvørvið og kvetta relatiónir við vaksin, sum  tey hava kent í 6 mðr. til aftur at skapa nýggjar relatiónir, tá tey vera flutt.

Umsitingin er farin í gongd við at finna høli.

Eitt uppskot kundi verið vøggustova og barnagarður í gamla realskúlanum. Í umhvørvinum í Kongagøtu eru góðir møguleikar til útivirksemi, bæði spælipláss í garðinum við Móttøkuhúsinum og spæliplássi í Grasagarði, umframt at tað virksemið, sum er ætlað fyri fimleikahøllina í Finsen, gagnligt fyri dagstovnatilboðið.

Virksemið í felagseindini í Kongagøtu kann eisini verða til gagns fyri vøggustovu- og barnagarðsvirksemi. Tað eru gjørdar tillagingar til frítíðarskúla virksemi í húsinum hjá Frk. Chor, sum eisini kann verða til gagns fyri dagstovnatilboðið fyrrapartin av degnum.

Fyrimunur er, at kommunan eigur bygningin og tískil er eingin leiga, men hølini skulu klárgerast, og óvist er, hvat tað kostar.

Aðrar loysnir kundi verið sethús, men tann marknaðurin er ikki lættur at koma framat í løtuni uttan stóran kostnað.

Undir øllum umstøðum verður neyðugt at útvega fígging, so at kommunan kann veita neyðugu plássini og ansingina, alternativt veita endurgjald fyri vantandi barnaansing.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja ☐** **Nei ☐**

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini boða nevndini frá plásstørvi og harvið fíggjartørvi til høli og rakstur, evt. endurgjald fyri vantandi barnaansing sbrt forsorgarlógini, og at umsitingin arbeiðir við loysnum at leggja aftur fyri nevnd.

**Mentamálanevndin 29. november 2017:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Dags dato er tørvur á 46 vøggustovuplássum og 17 barnagarðsplássum pr. 1. februar 2018.

Sum lýst omanfyri til fundin 29. november 2017 er arbeitt við at fáa til vega bráðfeingispláss og meira varandi loysnir.

Bráðfeingis ber til at skipa eina fyribils vøggustovu í gamla skúlanum á Hvítanesi. Har kunnu fáast til vega 10-12 pláss. Hetta er roynt áður, og ætlanin er, at leiðslan í Birkilund tekur sær av tilboðnum, ið er skjót at seta í verk. Staðbundna nevndin á Hvítanesi hevur givið samtykki til ætlanina treytað av, at ljósviðurskifti kring skúlan verða fingin í rættlag, at tað er væl frámerkt, hvar bilar til og frá skúlanum skulu parkera í bygdini, og at skelti verða sett upp í bygdini um, at ansa eftir børnum, ið spæla.

Harumframt verður stovnurin í Hornabø, sum byrjaði í august 2017, fyltur skjótari enn ætlað, so har verða 10-12 børn tikin inn.

<u>Realskúlin</u>
Umsitingin hevur arbeitt víðari við uppskotinum um at skipa part av gamla realskúlanum til dagstovn sum ein varandi miðbýarstovn, har hugsanin er, at hesin flytur og verður skipaður í skúlanum í Kongagøtu, tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020. Seinastu árini hava ov fá pláss verið í miðbýnum. Staðsetingin er tískil góð í mun til afturvendandi tørvin á fleiri plássum í miðbýnum.

Við ávísum tillagingum kann realskúlin gerast dagstovnur við ml. 30-54 plássum alt eftir, hvussu stóran part av bygninginum, ið brúktur verður til endamálið, og hvussu samansetingin ml. vøggustovu- og barnagarðsbørn er.

Húsaumsitingin greiðir nærri frá neyðugu tillagingunum.

Víst verður í hesum sambandi eisini til mál 17/03883 Skúlin á Fløtum hølisviðurskifti (Realskúlin).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at umrøða ætlanina við dagstovni í realskúlanum.

**Mentamálanevndin 10. januar 2018:** Málið umrøtt og nevndin tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við ætlanini at skipa Realskúlan til dagstovn.

**Ískoyti:**
Víst verður til samtyktina frá undanfarna nevndarfundi. Víst verður somuleiðis til uppskot um fígging at gera realskúlan kláran til dagstovn, mál 17/03656.

Í løtuni verða neyvari kostnaðarmetingar gjørdar við støði í tilboðsprísum. Ætlandi flytur Heilsuhúsið út komandi vikurnar soleiðis, at partur av realskúlanum kann takast í nýtslu sum dagstovnur umleið hálvan februar. Restin av realskúlanum verður tikin í nýtslu, tá allur bygningurin er tøkur og so hvørt tillagingarnar eru gjørdar. Harumframt verða høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum.

Til tess at kunna seta tillagingararbeiðini í gongd, og til tess at kommunan kann bjóða foreldrum nýggju plássini út, er neyðugt at staðfesta endaliga, at dagstovnur skal skipast í realskúlanum.

Nærri yvirlit yvir, hvussu aktuelli plásstørvurin verður loystur, verður lagt fram á fundinum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja, at dagstovnur verður skipaður í realskúlanum, harumframt eisini høli til Litir í leiki hjá Skúlanum á Fløtum, og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 22. januar 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 23. januar 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið til kunningar.

**Býráðsfundur 25. januar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Tað er framvegis støðugt trýst á kommununa um at veita fleiri dagstovnapláss. Hóast fleiri tillagingar eru gjørdar og aðrar ávegis soleiðis, at fleiri pláss eru komin á dagstovnaøkinum, so er avbjóðingin ikki bast, um hugt verður fram til várið 2019.

Við nýútvegaðu plássunum í gamla realskúlanum kann væntast, at tey, ið d.d. eru á bíðilista, fáa bjóðað pláss til ynsktu tíð í august 2018, hetta tó treytað av, at allur bygningurin verður nýttur til dagstovnavirksemi.

Hetta loysir bráðfeingisavbjóðingina til august, men eingi pláss eru frá september. Vanliga mynstrið er, at ml. 60 og 90 børn leggjast aftrat tíðarskeiðið september-mai.

Vísandi til ætlanina, at Skúlin á Fløtum flytur úr brúna skúla í Fríðriks Petersensgøtu (sí mál 17/03883), er møguleiki at brúka bygningin til dagstovn frá sumrinum ella so skjótt til ber at hava bygningin kláran. Mett verður, at hetta er góður “buffari” at fylla upp so hvørt tørvur er á dagstovnaplássum tíðarskeiðið fram móti jólum alt eftir, hvussu nógv børn rúmast har.

Alneyðugt er tó eisini at taka avgerð um meira framtíðartryggjaðar loysnir, so henda bráðfeingisstøða, har nýggjar fyribilsloysnir er einasti handlimøguleiki, ikki gerst vanliga støðan.

Í fyrireikingararbeiðinum til talgildu plássupptøkuskipanina, sum fer at geva umsitingini munandi betri møguleika at staðfesta plásstørv mánaðir fram í tíðina, og í arbeiðinum at gagnnýta møguliga tøkan plásskapasitet á dagstovnaøkinum, hava barna- og ungdómsdeildin og húsaumsitingin pláss-skrásett allar stovnar og stovur. Hetta er gjørt eisini í mun til nýggju bygningskunngerðina, sum vísir á minsta mark fyri fermetrum til hvørt barn á dagstovni/stovu, og í mun til námsfrøðiligt viðmæli um bólkastødd av børnum í dagstovnaaldri.

Henda gjøgnumgongd vísir, at onkrir stovnar hava heldur stórt barnatal, meðan aðrir kunnu rúma fleiri børnum, verða ávísar tillagingar gjørdar. Henda støða, har onkrir stovnar skulu hava færri børn enn í dag, eigur at takast við, tá ið samlaði plásstørvurin verður viðgjørdur. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

Niðanfyri verður víst á loysnir:

1. Til tess at basa bráðfeingistørvin, ið er, og sum aftur kemur á heysti 2018:
    - At allur gamli realskúlin verður nýttur til dagstovnavirksemi. Realskúlin hevur í løtuni 21 pláss. Tá allar tillagingarnar eru lidnar, rúmast bygningurin í mesta lagi 68 børnum, hetta veldst um samansetingina av vøggustovu- og barnagarðsbørnum.
    - At brúni skúli verður tillagaður og nýttur til dagstovnavirsemi frá heysti 2018. Í løtuni verður kannað, hvussu nógvum børnum, ið brúni skúli kann rúma, hvat krevst av tillagingum, og hvat tað verður mett at kosta, men roknast kann helst við trimum stovum. Eisini verður kannað, hvørt bygningurin er egnaður sum ein varandi loysn, ella um hetta er at meta sum ein fyribilsloysn.
    - At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribils loysn. Loysnin er á Hvítanesi er væl umtókt og kann halda fram uttan stórvegis tiltøk.

2. Til tess at fáa til vega fleiri pláss við at tillaga innrætting á nøkrum stovnum:
    - At arbeitt verður víðari við uppskotunum um tillagingar í innrætting.
    - At avbjóðingin, ið ávísir stovnar hava við barnatalinum, verður umrødd og atlit tikið til tað yvir tíð, harundir ávís býlingshús og Kurla.

Sum omanfyri lýst eru allir verandi dagstovnar gjøgnumgingnir av barna- og ungdómsdeildini og húsaumsitingini til at meta um, á hvørjum stovni tað ber til at gera tillagingar í innrætting,

so stovnurin kann rúma fleiri børnum. Burturúr hesum eru komin ymisk uppskot uppá tillagingar at økja plásskapasitetin. Fyrimunur við hesum er, at einstaka rakstrarstaðið fær betri rakstrargrundarlag, og at bygningarnir verða fullnýttir við nýggjum varandi plássum, heldur enn at økja um talið av bygningum/rakstrarstøðum.

Enn vantar at kostnaðarmeta uppskotini, sum aftur er grundarlag fyri eini raðfesting, har hetta loysir seg best. Greitt verður nærri frá hesum á fundinum.

3. Til tess at framtíðartryggja plásskapasitetin við út- og nýbygging, har tað eisini verða fingin til vega nýggj varandi pláss (íløgur):
   - At arbeiða víðari við uppskotum um at byggja út ávísar dagstovnar.
   - At arbeiða víðari við uppskoti um at byggja nýggjan og størri dagstovn á Argjum í staðin fyri verandi dagstovnin á Argjum.
   - At arbeiða víðari við uppskoti at tillaga Skúlan í Kongagøtu til varandi miðbýarstovn, tá bygningurin verður tøkur summarið 2020.

Nýggj varandi pláss er fortreyt fyri, at tað støðugt skal bera til at veita foreldrum plásstrygd. Harumframt er tað fortreyt fyri endurnýggjan av ótíðarhóskandi plássum, har antin bygningurin eigur at verða saneraður sum dagstovnur ella er ikki egnaður á annan hátt.

Uppskot fyriliggur uppá útbygging av dagstovninum á Hamrinum á Argjum. Treytað av, at nýtt lendi verður lagt aftrat verandi grundøki, kann fáast ein vøggustova og eina barnagarðsstova afturat. Kostnaðarmeting uttan lendiskeyp er nakað yvir kr. 10 mió. Til ber eisini at byggja dagstovnin í Maritugøtu út við einum vognrúmi, sum leysgevur annað høli á stovninum til 10 nýggj vøggustovupláss. Hetta uppskot er ikki kostnaðarmett enn. Metast má, at eisini aðrir stovnar við fyrimuni kunnu byggjast út, og eigur hetta at verða kannað ítøkiliga beinanvegin, íroknað kostnaðarmeting og raðfesting.

Mentamálanevndin hevur áður fingið lagt fram uppskot til nýggjan og væl størri dagstovn á Argjum (mál 17/03943) lutvíst til at endurnýggja ótíðarhóskandi stovnspláss/bygning og til at útvega uml. 40 pláss fleiri (samlaður plásskapasitetur sbrt. uppskotinum 112). Kostnaður uml. kr. 35 mió. Til ber ikki einki at gera, tí verandi stovnur krevur stórar og kostnaðarmiklar ábøtur.

Tá Skúlin á Fløtum er liðugur í 2020 og flutt verður úr skúlanum í Kongagøtu, er uppskot, at bygningurin verður gjørdur um til dagstovn at koma í staðin fyri realskúlan, sum ætlandi er fyribilsloysn. Mett verður, at bygningurin rúmar 100-120 børnum alt eftir samansetingini av vøggustovu- og barnagarðsbørnum. Fyrimunur er, at bygningurin rúmar øllum børnunum í realskúlanum umframt t.d. Kurlu ella brúna skúla, verða hesi niðurløgd. Bygningurin í Kongagøtu er nýggjur og í góðum standi, og mett verður ikki neyðugt við stórum tillagingum.

Fyrimunur við hesum uppskoti er, at kommunan sleppur undan íløgu í nýggjan dagstovn, ið ikki verður minni enn tær kr. 35 mió, sum nýggi dagstovnurin á Argjum verður mettur at kosta, og mett verður ikki sannlíkt, at kommunan byggir tveir stovnar við uml. 100 plássum í senn, hóast plásstørv.

<u>Fíggjartørvur:</u>
Til tess støðugt at fáa til vega nýggj pláss, tað verið seg við smærri tillagingum í innrætting, útbyggingum og nýbyggingum, er neyðugt at raðfesta fígging til endamálið bæði í rakstri og íløgum. Umsitingin kemur við neyvari greining av tørvi, so hvørt uppskotini verða kostnaðarmett og raðfest. Roknast kann við nýggjum fíggjartørvi í inniverandi ári.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at samtykkja:
- At allur realskúlin verður dagstovnur í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21.
- At brúni skúli verður dagstovnur frá august 2018 í minsta lagi fram til ársskiftið 2020/21, og at umsitingin ger neyvari meting um kostnað at gera bygningin kláran til dagstovn at leggja aftur fyri nevndina.
- At skúlin á Hvítanesi framhaldandi verður brúktur sum fyribilsloysn.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at samtykkja:
- At umsitingin leggur fram neyvari raðfesting av tillagingarmøguleikum í innrætting á dagstovnum, har tað verður mett at hava fyrimun at økja plásskapasitetin.
- At heimild verður latin umsitingini at fáa til vega ítøkilig og kostnaðarmett uppskot til útbyggingar av verandi stovnum.
- At prinsipiell støða verður tikin til uppskotið, sum lagt er fram um bygging av nýggjum og størri dagstovni á Argjum, og at fáa fígging til vega í langtíðaríløguætlanini.
- At taka prinsipiella støðu til, at skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til varandi dagstovn eftir summarið 2020, og at umsitingin fær heimild at fyrireika ætlanina.

**Mentamálanevndin 23. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teim fyrstu seks tilmælunum, og at fara undir eina tilgongd at avgera, hvat skúlabygningurin í Kongagøtu skal brúkast til.

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Víst verður til tilmæli og samtyktir omanfyri.

Høvuðsavbjóðing júst nú er:
- At tað eru ov nógv børn inni á fleiri stovnum
- At nettotilflytingin av børnum undir skúlaaldur eftir øllum at døma hevur verið serliga stór í 2017
- At rættiliga stórur bíðilisti er eftir plássum longu frá august

Hetta lagt saman gevur ein tørv á plássum svarandi til ein miðal árgang í aldrinum 0-7 ár.

Raðfestast má í fyrsta lagi at útvega nýggj pláss, áðrenn til ber yvir tíð at lække barnatalið á ávísum stovnum.

Staðfest er, at realskúlin verður ikki allur tikin í nýtslu fyrr enn 1. november 2018, tí arbeiðið verður ikki liðugt fyrr enn tá. Í løtuni eru 25 børn í realskúlanum, men væntast kann ikki, at hini uml. 40 plássini eru tøk fyrr enn í november. Ætlandi er realskúlin fyribils loysn tvey ár fram, tvs. hesi skulu endurútvegast í seinasta lagi um tvey ár. Brúni skúli kann, um arbeiðið fer í gongd nú í summar, væntandi verður klárur at taka í nýtslu í januar 2019. Har eru 64 varandi pláss.

Støðan ger, at arbeiðast mugu við fleiri loysnum í senn og tað beinanvegin.

Gjørd eru nú uppskot og fyribils kostnaðarmetingar uppá tillagingar í Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, sum samlað geva 44 pláss (24 VG og 20 BG) fyri uml. kr. 2,5 mió handverkaraútreiðslur, tvs uttan mvg, byggiharraútreiðslur, innbúgv v.m.

At tillaga Brúna skúla við neyðugum útbyggingum av vognrúmi, vognskúri, svala (útgongdum frá stovum), innrættingum í stovnunum, liðugt gjørt útiøki v.m. er mett til kr. 6,3 mió – í hesum føri er allar byggiharraútreiðslur íroknaðar.

Hesar fýra verkætlanirnar geva sostatt 108 varandi pláss fyri uml. kr. 10 mió í íløgum, og kunnu allar verða lidnar komandi 6-7 mánaðirnar, verður arbeiðið byrjað nú.

Verður skúlin í Kongagøtu gjørdur um til dagstovn um 2-2,5 ár, so verða 100 pláss aftrat fyri ta upphædd, ið tillagingarnar kosta – í tí førinum mest smærri innrættingar.

Dagstovnurin á Argjum er størri íløguætlan, har tað í fyrsta umfari snýr seg um at framtíðartryggja verandi 70 plássini við at byggja nýggjan og størri stovn, har tað kunnu fáast uml. 33 pláss aftrat. Kostnaðarmetingin fyri uppskotið til bygning, ið lagt er fram í mentamálanevndini, er uml. kr. 35 mió, men hetta skal viðgerast neyvari. Tó eigur upphædd til neyvari verkætlanarfyrireikingar og prosjekting at verða fingin til vega skjótast og helst í inniverandi ári, so at møgulig bygging kann byrja næsta ár.

Øll hesi átøk, har plássini í skúlabygninginum í Kongagøtu og nýggja Dagstovninum á Argjum tó ikki kunnu roknast við fyrr enn í 2020/21, samstundis sum plássini í realskúlanum tá ætlandi detta burtur, geva í alt 176 pláss.

Trygd er ikki fyri, at hetta er nokk, men innanfyri komandi 6-8 mánaðirnar eru tó við uppskotunum omanfyri sannlíkindi fyri, at til ber at hava 148 nýggj pláss tøk (Velbastað 20 BG, Maritugøta 12 VG, Inni á Gøtu 12 VG, Brúni skúli 64, Realskúlin 40).

Kollafjørður:
Plásstrot er eisini á Dagstovninum Kura í Kollafirði. Barnatalið er hækkað nakað síðstu árini, og ábendingar eru um framhaldandi vøkstur í barnatalinum. Møguleikar at byggja Kuru út við eini vøggustovu og eini barnagarðsstovu eiga tí at kannast, umframt at frítíðarskúlin og ungdómstilboðið halda til í lutvíst leigaðum hølum, ið ikki longur eru hóskandi. Kommunan kundi sum fyribils loysn tikið upp samband við samkomuna Zion, ið er beint við, við tí endamáli at leiga og innrætta kjallaran til dagstovn, og annars hava felags garð við Kuru. Hesi pláss kunnu sostatt útvegast yvir rakstur.

Onnur atlit:
Tá so stórt fokus er á bráðfeingis tørvin, so eigur at verða mint á onnur atlit, ið eisini hava við sær øktan plásstørv og harvið fígging. Dagstovnurin í Kaldbak er eisini við at vera ov lítil. Dagstovnurin í Løkjatúni hevur ikki nøktandi umstøður til vognar, kjallarahæddin í Býlingshúsinum í Norðasta horni skal umvælast og kundi hýst nýggjari barnagarðsstovu, Býlingshúsið á Ternuryggi manglar vognrúm, og Stella Maris hevur tørv á tillagingum, tí bygningurin er gamal.

Onnur vaksandi avbjóðing eru børn við “serligum serligum” tørvi. Hetta eru børn, sum ikki kunnu vera í vanligu stovunum á dagstovnaøkinum vegna heilsuvanda eitt nú í mun til smittu,

ella hava umfevnandi menningaravbjóðingar. Her kunnu smærri rúm á ávísum stovnum setast av til hetta, men sum kann ávirka vanliga plásskapasitetin.

Til slík atlit eigur ein føst upphædd, t.d. kr. 1 mió, at verða sett av árliga á kontu 3214 broytingar og minni umvælingar.

Fígging:
Arbeiðið við realskúlanum er fíggjað, men tað eru hinar ætlanirnar ikki.

Størsta arbeiðið í mun til loysnirnar her og nú er Brúni skúli. Her er møguligt at flyta kr. 6 mió av íløgujáttanini, sum ætlað er til musikkskúlabyggingina í ár, tí roknað verður har við minninýtslu í ár. Hetta hevur sostatt ikki avleiðing fyri musikkskúlabyggingina, men krevur tó, at upphæddin verður játtað aftur til musikkskúlabyggingina í 2019.

Verkætlanirnar á Velbastað, Maritugøtu og Inni á Gøtu hava onga fígging. Her mugu útvegast ml. kr. 3-3,5 mió til endamálið.

Eingin játtan er sett av til verkætlanarfyrireikingar og prosjektering av nýggjum Dagstovni á Argjum. Mett verður, at neyðugt er við kr. 3,5 mió til endamálið til tess at menna prosjektið fram til útboð (mál 17/03943).

Spurningurin um framtíðina hjá skúlabygninginum í Kongagøtu má takast skjótast.

Verður hann ikki dagstovnur, má annar stovnur í miðbýnum byggjast og arbeiðið at fyrireika prosjekt tí byrja beinanvegin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at játta kr. 6 mió til at út- og umbyggja Brúna skúla til dagstovn, íroknað at gera útiøkið liðugt, og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Mælt verður til, at arbeiðið verður fíggjað við at flyta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L0001 til løgukontu 3175 barnaansing, sum verður at játtað musikkskúlaverkætlanini aftur í fíggjarætlanini 2019.

Harumframt mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til at taka undir við uppskotunum um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið við at umraðfesta í íløguætlanina fyri 2018, og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla somuleiðis til at játta kr. 3,5 mió til prosjektfyrireikingar v.m. av nýggjum Dagstovni á Argjum við umraðfestingum í íløguætlanini fyri 2018, og í hesum sambandi at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla eisini til at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningin teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

At enda mæla trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini til endaliga støðutakan um skúlabygningurin í Kongagøtu verður at brúka til dagstovn eftir 2020, og um ikki, so at játta fígging kr. 1 mió til at seta í gongd prosjektfyrireikingar v.m. til bygging av nýggjum

dagstovni í miðbýnum, og í hesum sambandi at at seta bygginevnd samsvarandi reglugerð um íløguverkætlanir størri enn kr. 20 mió.

**Mentamálanevndin 06. juni 2018**: Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Jákup Dam, samtykti at taka undir við tilmælinum um at gera brúna skúla um til dagstovn og játta kr. 6 mió av løgukontu 5175 Musikkskúlin løgukarmur L00001 til løgukontu 3175 barnaansing, og í hesum sambandi heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út og gera neyðugar sáttmálar. Málið beinast í býráðið um fíggjarnevndina.

Harumframt samtykt at geva umsitingini heimild at samráðast við samkomuna Zion í Kollafirði um møguleikan at leiga og innrætta kjallarahæddina í bygningi teirra til dagstovnavirksemi at leggja aftur fyri nevndina.

Vent verður aftur til hini tilmælini á seinni fundi.

Ein minniluti, Heðin Mortensen og Halla Samuelsen, stemma blankt og krevja málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til uppskotini til síðsta mentamálanevndarfund um tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu til tess fáa 44 nýggj dagstovnapláss at nøkta part av bráðfeingis plásstørvinum, og sum mett verður kosta kr. 3,5 mió at fáa til vega. Til henda fund var tó ikki møguligt at ávísa fígging.

Mett verður, at til ber at flyta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 ætlað umlættingar- og rehabiliteringsdepli, tí roknað verður við, at henda verkætlanin hevur ikki tørv á allari játtanini í ár. Hetta hevur sostatt ikki nakra avleiðing fyri verkætlanina í ár, men krevur tó, at umlættingar- og rehabiliteringsdepilin (L27011) hesa játtan aftur sum part av samlaðu íløgujáttanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Tikið av skrá vísandi til, at nevndarlimir hava kravt málið fyri býráðið.

**Ískoyti:**
Víst verður til síðsta ískoytið og tilmælið omanfyri um at játta kr. 3,5 mió til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Sambært nýggjum kostnaðarmetingum verður játtanartørvurin helst um kr. 5,5 mió.

Mett verður, at fyri tær kr. 3,5 mió ber í øllum førum til at fremja tvær av ætlanunum, men til ber ikki at staðfesta endaliga kostnaðin fyri allar ætlanirnar fyrr enn tilboðskostnaðurin fyriliggur eftir útboð. Mett verður tí skilabest, at umsitingin við støði í innkomnu tilboðunum raðfestir ætlanirnar, ið kunnu figgjast innanfyri kr. 3,5 mió, og at møgulig fígging til triðju ætlanina verður reist antin sum eykajáttanarmál í 2018 ella sum partur av fíggjarætlanini fyri 2019.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at gera ávísar tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu, og í hesum sambandi at játta kr. 3,5 mió til endamálið og heimila umsitingini at bjóða arbeiðini út og gera neyðugar sáttmálar.

Trivnaðarstjórin, heilsu- og umsorganarstjórin og leiðarin fyri barna- og ungdómsdeildina mæla til at játta kr. 3,5 mió av løgukarmi 2775 eldrarøkt L00001 til løgukontu 3175 barnaansing til endamálið.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Turið Horn og Marin Katrina Frýdal, tekur undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen, mælir til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018**: Ein meiriluti Annika Olsen, Turið Horn og Gunvør Balle tekur undir við samtyktini í Mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein mælir til at gera tillagingar av Dagstovninum á Velbastað, Býlingshúsinum í Maritugøtu og Býlingshúsinum Inni á Gøtu. Umframt verður víst á tað, ið minnilutin í Mentamálanevndini vísir á.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Fyrst varð atkvøtt um soljóðandi broytingaruppskot frá Helenu Dam á Neystabø, Hallu Samuelsen, Tróndur Sigurðsson, Bjørg Dam, Bjørghild Djurhuus og Annfinn Brekkstein:

Mælt verður til ikki at gera realskúlan til dagstovn, men at lata Skúlan á Fløtum bygningin til skúla og ístaðin útvega nýggj dagstovnapláss eftir sama leisti sum Spíranum í Havnardali.

Uppskotið fall við seks atkvøðum fyri og sjey ímóti.

Fyri atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen og Ruth Vang.

Síðani varð atkvøtt um samtyktina hjá meirilutanum í mentamálanevndini tann 6. juni 2018 og samtyktina hjá meirilutanum í fíggjarnevndini tann 20. juni 2018, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og trimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Ruth Vang, Helena Dam á Neystabø , Annfinn Brekkstein og Bjørghild Djurhuus

Blankt atkvøddu: Bjørg Dam, Tróndur Sigurðsson og Halla Samuelsen.

**Býráðsfundur 30. august 2018**: Einmælt samtykt.

# 193/18 Ferðslukanningar kring økið við skúladepilin í Marknagili

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 17.06.2014 | 200/14 | 14/03118-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 18.06.2014 | 191/14 | 14/03118-2 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 143/14 | 14/03118-2 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 255/14 | 14/03118-2 |
| 5 Ferðslunevndin | 18.12.2014 | 87/14 | 14/03118-2 |
| 6 Ferðslunevndin | 26.02.2015 | 27/15 | 14/03118-2 |
| 7 Ferðslunevndin | 10.03.2015 | 36/15 | 14/03118-2 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.04.2015 | 44/15 | 14/03118-2 |
| 9 Fíggjarnevndin | 22.04.2015 | 103/15 | 14/03118-2 |
| 10 Býráðsfundur | 23.04.2015 | 79/15 | 14/03118-2 |
| 11 Tekniska nevnd | 07.10.2015 | 89/15 | 14/03118-2 |
| 12 Tekniska nevnd | 04.11.2015 | 138/15 | 14/03118-2 |
| 13 Fíggjarnevndin | 11.11.2015 | 278/15 | 14/03118-2 |
| 14 Býráðsfundur | 19.11.2015 | 218/15 | 14/03118-2 |
| 15 Tekniska nevnd | 06.04.2016 | 44/16 | 14/03118-2 |
| 16 Tekniska nevnd | 01.06.2016 | 63/16 | 14/03118-2 |
| 17 Tekniska nevnd | 18.04.2017 | 29/17 | 14/03118-2 |
| 18 Fíggjarnevndin | 19.04.2017 | 87/17 | 14/03118-2 |
| 19 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 125/17 | 14/03118-2 |
| 20 Tekniska nevnd | 09.05.2017 | 31/17 | 14/03118-2 |
| 21 Fíggjarnevndin | 20.06.2017 | 163/17 | 14/03118-2 |
| 22 Býráðsfundur | 20.06.2017 | 186/17 | 14/03118-2 |
| 23 Tekniska nevnd | 07.11.2017 | 66/17 | 14/03118-2 |
| 24 Fíggjarnevndin | 15.11.2017 | 266/17 | 14/03118-2 |
| 25 Býráðsfundur | 22.11.2017 | 276/17 | 14/03118-2 |
| 26 Býráðsfundur | 14.12.2017 | 300/17 | 14/03118-2 |
| 27 Tekniska nevnd | 06.03.2018 | 17/18 | 14/03118-2 |
| 28 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 112/18 | 14/03118-2 |
| 29 Tekniska nevnd | 08.05.2018 | 34/18 | 14/03118-2 |
| 30 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 187/18 | 14/03118-2 |
| 31 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 150/18 | 14/03118-2 |
| 32 Tekniska nevnd | 14.08.2018 | 45/18 | 14/03118-2 |
| 33 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 235/18 | 14/03118-2 |
| 34 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 193/18 | 14/03118-2 |
| 35 Býráðsfundur | | | 14/03118-2 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við ætlaðu byggingina kring skúladepilin í Marknagili verður roknað við nógvari øktari ferðslu. Væntast kann eisini, at útstykkingarbyggingar oman fyri Marknagilsvegin fara at gera sítt til øktu ferðsluna. Harnæst kann væntast økt ferðsla til Argir, tá brúgvin um Sandá verður tøk seinni í 2016.

Sambært frágreiðingum frá 2006, ið umsitingin hevur latið gera saman við ráðgeva frá Rambøll ísv. heildarætlan fyri Tórshavnar kommunu, verður m.a víst á ein framtíðar tørv fyri ‘trafikafvikling’ grundað á framskrivingum av ferðslutrýstinum. Í

hesum sambandi verður brúk fyri at gera eina ítøkiliga ferðsluanalysu av ferðsluviðurskiftunum, sum m.a. skal lýsa støðuna í dag og hvussu verður, tá alt skúlaøkið verður fult útbygt.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Umsitingin hevur fingið eina kostnaðarmeting áljóðandi kr. 70.000,- u/mvg fyri arbeiðið. Afturat hesum koma útreiðslur fyri ferðaútreiðslur og fundarvirksemi.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka av tilboðnum og at játta kr. 125.000 til kanningararbeiðið av konto 8175 Aðrar vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 17. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin kemur, saman við ráðgeva, at kunna um málið.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið frágreiðing (j. nr. 14/03118-12): notat vedr. trafikafvikling i univeritetsområdet, november 2014) umframt eina framløgu/film um ferðslusimulering (j.nr.14/03118-15) av framtíðar ferðslu á økinum kring allan skúladepilin. Í frágreiðingini eru ymisk uppskot um vega-íbindingar gjøgnumgingin og verður m.a ført fram, at besta loysn er uppskot nr. 7, sum tekur støði í at verandi innkoyring frá Marknagilsvegnum verður uppstigað til eitt stórt signalanlegg. Harumframt verður lagt upp til at býlingarnir undir Gráasteini eisini verða knýttir í hetta vegamótið.

**Ferðslunevndin 18. desember 2014:** Kunnað var um málið. Arbeitt verður víðari við málinum.

**Ískoyti:**
Í framhaldandi viðgerð av uppskoti nr. 7, eru staðfestir smærri ferðslutrupulleikar í simuleringini í sambandi við avgreiðslu av ferðslu inni á universitetsøkinum í Marknagili. Umsitingin hevur tí í samráð við ráðgeva og umboð fra Landsverki latið gera eitt dagført uppskot 14/03118-23 uppskot nr. 8, sum tekur støði í tveimum signalanleggum fram við Marknagilsvegnum í staðin fyri einum, sum uppskot nr. 7 legði upp til. Tann eina íbindingin verður staðsett 230 sunnan fyri verandi íbinding og hin einar 140 m norðanfyri. Harumframt verður í uppskotinum lagt upp til at vegastrekkið millum komandi Vesturskúlan og Musikkskúlan og Skúladepilin í Marknagili, sum skal gerast sum sivugøta, kemur at bera ferðslu til og frá í ferðslutrýstinum í morgunmeldrinum, meðan tað í hinum dagtímunum burturav verður ætlað til bleyta ferðslu.

**Ferðslunevndin 26. februar 2015:** Málið umrøtt.

**Ferðslunevndin 10. mars 2015:** Nevndin mælir til at taka undir við uppskoti 8 samsvarandi notati 02 frá 19. februar 2015 frá Rambøll. Málið beint í teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Saman við fyrilggjandi uppskoti nr. 8, sum tekur støði í trimum vegamótum við ljósreguleringum og vegaloysn inni á sjálvum skúlaøkinum – frá Landavegnum umvegis Musikkskúlan og Vesturskúlan, skal tekniska nevnd taka støðu til fígging av hesum framtíðar íløgum.

Eftir sum ferðslutrýstið endurspeglar nýtsluna av økinum, vildi tað verið hóskandi at býtt arbeiðið upp í 3 stig, vísandi til at Skúladepilin og Musikkskúlin byrja á heysti í 2016 og Vesturskúlin í 2019.

1. Marknagil ferðsla 1. stig
   Talan er um gerð av nýggjum vegamóti við ljósregulering. Staðsetingin er við sunnara markið á matr. nr. 1104d. Tórshavn, eigari: Tórshavnar kommuna.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 3 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2016
2. Marknagil ferðsla 2. stig
   Talan er um vegagerð inni á matr. nr. 1104d, 1102c, 1099 og 917, har Tórshavnar kommuna er eigari av øllum matriklum. Vegagerðin fevnir um ein uml. 10-12 m breiðan veg við eini samlaðari longd upp á uml. 500 m.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 10 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019
3. Marknagil ferðsla 3. stig
   Talan er um regulering av vegamótunum við Landavegin og Kirkjubøarvegin og tillaging av vegastrekkinum ímillum.
   Fyribils mettur kostnaður – uml. 6 mió. kr.
   Arbeiðið má gerast liðugt innan august 2019

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Samlaði kostnaðurin fyri omanfyri nevndu arbeiði gerst sostatt uml. 19 mió. kr.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 500.000,- til projektering.

**Tekniska nevnd 08. apríl 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í fíggjarnevndina at ávísa fígging.

**Fíggjarnevnd 22. april 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 500.000,- av konto 8175, aðrar vegaverkætlanir og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 23. apríl 2015:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot um vegaætlan. Nevndin skal taka støðu til vegaætlan og útbjóðingarhátt.

**Tekniska nevnd 07. oktober 2015:** Umsitingin greiddi frá málinum.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur, saman við ráðgeva, gjørt eina kostnaðarmeting grundað á skitsuuppskot av byggistigunum 1 og 2, áljóðandi kr. 16,9 mió. Kostnaðarmetingin fyri byggistig 1 er kr. 6,3 mió. og fyri byggistig 2 kr. 10,6 mió. Víst verður til j. nr. 15/03118-47.

Mett verður at tað er skilagott at fremja bæði byggistigini í einum, vísandi til at arbeiði býtt í tvær arbeiðstøkur førur við sær eyðkaútreiðslur ísv. tilrigging og avrigging av arbeiðsplássi v.m.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 16,9 mió. til gerð av útbjóðingartilfari fíggjað av íløgum fyri vegir. Mælt verður til at játtanin verður framd soleiðis, at kr. 4,3 mió. verða játtaðar í 2016 og kr. 12,6 mió. í 2017. Mælt verður harumframt til at beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið

**Tekniska nevnd 04. november 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 11. november 2015:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4,3 mió. í 2016 og kr. 12,6 mió. kr. í 2017 fíggjað av til íløgum til vegir til gerð av útbjóðingartilfari og vegi.

**Býráðsfundur 19. november 2015:** Einmælt samtykt at játtað kr. 4,3 mió í 2016 og at seta kr. 12,6 mió á íløgujáttanina fyri 2017.

Borgarstjórin ynskir at viðgera málið í teknisku nevnd.

**Tekniska nevnd 06. apríl 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt tvey uppskot til vegaføring inni á skúlaøkinum við íbinding í Landsvegin og Marknagilsvegin og vegin, ið gongur eystur til Glasir.

**Prosjektuppskot nr. 1**
Uppskotið tekur støði i einum sokallaðum sivivegi, har vegbanabreiddin er 2*3 m við gongubreytum í báðum síðum á 2 m. Vegurin er ikki egnaður til bussferðslu. Um bussurin koyrir á hesum vegi, so noyðist hann at nýta koyrimáta B, og tá verður ikki hildið at trygdin er í lagi. Tá nýtir bussurin vegaareal á økinum hjá mótkoyrandi ferðslu.

**Prosjektuppskot nr. 2**
Uppskotið tekur støði í sama vegaprofili sum í uppskoti nr. 1, men vegaføringin er broytt til at kunna taka bussferðslu við teimum býbussunum, sum Tórshavnar kommuna nýtir í løtuni. Teir eru 9 m langir. Tað vil siga, at bussurin nýtir koyrimáta A, sum er meiri plásskrevjandi og bleytari kurvar.
Hetta vil hava við sær, at neyðugt verður at fáa til vega nakað av lendinum hjá Dagstovninum við Landavegin, matr. nr. 918b, Tórshavn umleið 480 $m^2$ av lendinum.
Neyðugt verður eisini at samráðast um at fáa til vega umleið 100 $m^2$ av lendinum, matr. nr. 917, Tórshavn, sum eg ogn hjá nýggja musikkskúlanum.

**Av og áseting við nýggja skúla á Fløtum**
Ætlanin er at gera ein geira til av- og áseting av skúlabørnum í høgra borði av vegnum, tá koyrt verður frá Landavegnum og niðan til skúlaøkið.

Tá koyrt verður frá Marknagilsvegnum og oman ímóti skúlaøkinum, so hevur umsitingin heitt á ráðgevan um at gera eitt uppskot til av- og áseting í høgra borði, har børnini ganga ígjøgnum ein tunnil undir vegnum og inn á skúlaøkið. Tann parturin er við lágdeildina, har lendið liggur lágt.
Um uppskotið skal bera til, so er neyðugt við samráðingum við sjálvsognarstovnin, sum varðar av Dagstovninum við Landavegin og harvið matr. nr. 918b, Tórshavn.
Uppskotið leggur eisini upp til, at ein gøta verður gjørd frá barnagarðsøkinum og niðan til tunnilin, soleiðis at barnagarðsbørn eisini kunnu gagnnýta spæliøkið við nýggja skúlan á Fløtum.

**Íbindingin í Marknagilsvegin**
Umsitingin hevur kannað, um tað er møguleiki fyri at flyta íbindingina einar 20 – 25 m vestureftir, soleiðis at parkeringsarealið til skúlan kemur at liggja á somu síðu eystaru megin atkomuvegin til skúlaøkið, men tá verður neyðugt at taka einar 500 fermetrar av ognini hjá Kristniboðssambandið, matr. nr. 919b.

**Skjøl í málinum**
TK j. nr. 16/02144-1: Uppskot nr. 1 Plantekning og yvirlitstekning
TK j. nr. 16/02144-2: Uppskot nr. 2 Plantekning og yvirlitstekning

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeitt verður víðari við prosjektuppskoti nr. 2, og at gera høvuðsprosjekt og bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión til fimm arbeiðstakarar at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 01. juni 2016:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.
Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrun Mohr og Bogi Andreasen, samtykti at loyva innkoyring eftir verandi vegi, Janusargøta, frá báðum síðum á Marknagilsvegnum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við fyrireikingarnar at byggja nýggja Skúlan á Fløtum, eru ynskir frammi um at gera ein arbeiðsveg frá Marknagilsvegnum og oman til arbeiðsøkið, har tann nýggi skúlin skal byggjast. Ætlanin er at nýta arbeiðsvegin sum vegatkomu í sambandi við byggingina av nýggja skúlanum. Tá er brúk fyri at hava neyðugt pláss til at koma við stórum bygningslutum í sambandi við byggingina.

Arbeiðsvegurin er partur av lidna vegaprosjektinum, sum verður sambindingarvegurin til skúlaøkið í Marknagili frá Landavegnum og niðan í Marknagilsvegin. Umsitingin er í gongd við fyrireikingarnar at gera høvuðsprosjekt og at bjóða arbeiðið út.

Arbeiðstakarin Articon P/f hava latið Tórshavnar kommunu tilboð uppá gerð av fyribilsvegnum.

**Fíggjarlig viðurskifti**
Umsitingin hevur gjørt eina samlaða kostnaðarmeting grundað á tilboðið frá Artion áljóðandi kr. 2.500.000.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01243-3 | Tilboð frá Articon P/f |
| TK j. nr. 17/01245-1 | Samlað kostnaðarmeting |

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla býráðnum til, umvegis teknisku nevnd og fíggjarnevndini, at taka av tilboðnum frá Articon áljóðandi kr. 2.500.000. Játtan til arbeiðið er tøk á verkætlan L81018 Miðstaðarøki í Marknagili.

**Tekniska nevnd 18. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 19. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Fyrst varð atkvøtt um tilmæli frá Annfinn Brekkstein, um at beina málið aftur í teknisku nevnd og at vegastubbin verður boðin alment út, ið fall við 5 atkvøðum fyri og 7 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen.

Ímóti atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass og Gunvør Balle
Síðan varð atkvøtt um tilmæli frá frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle

Atkvøddi blankt: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur arbeitt við at planleggja vegaføringina inni á skúlaøkinum í Marknagili og umleggingina av høvuðsveganetinum rundan um skúlaøkið, sum er Marknagilsvegurin, Landavegurin og Kirkjubøarvegurin.

**Rundkoyring á vegamótinum Landavegur - Samdingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Arbeitt hevur verið við at kanna møguleikarnar fyri at gera eina rundkoyring á vegamótinum, sum líkist rundkoyringini á vegamótinum Fræsið/Landavegur.

**Sambindingarvegur millum Landavegin og Marknagilsvegin**
Vegaføringin er ein tvísporaður vegur á 2*3,25 við 2 m gongubreyt og 2 m súkklubreyt í báðum borðum.
Ein íbinding verður vestur til Dagstovnin við Landavegin, av tí at ætlanir eru um, at verandi íbinding frá Landavegnum verður niðurløgd.
Ein íbinding verður gjørd inn til nýggja musikkskúlan.

Fyri at gera av- og ásetingarætlanina so trygga sum møguligt til nýggja Skúlan á Fløtum, verður vegurin eftir íbindingina eystur til musikkskúlan og niðan til Janusargøtu ein einsrættaður vegur.

**Vit byrja í niðara borði**

| | | |
|---|---|---|
| Gongubreyt | 2,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Einsrættað vegbreyt | 3,25 | m |

| | | |
|---|---|---|
| Ferðsluherða | 1,5 | m |
| Vegbreyt til av- og áseting | 2,5 | m |
| Av- og ásetingarherða | 1,0 | m |
| Súkklubreyt | 2,0 | m |
| Gongubreyt | 2,0 | m |

**Íbinding frá Janusargøtu og vestur í sambindingarvegnin**
Janusargøta verður bundin í sambindingarvegin.
Her er neyðugt við umleggingum av verandi tekniskum installatiónum í Janusargøtu.
Arbeiðstøkumarkið verður millum ognina hjá Tórshavnar kommunu og økið, sum hoyrir til Glasir.
Ætlanin er at 12 m bussar skulu kunna koyra inn á Janusargøtu frá sambnindingarvegnum. Samstarvsfundir hava verið millum Tórshavnar kommunu og umboð fyri Glasir, har veganetið inni á kommunalum vegaøki og vegaøkinum hjá Glasir ver planlagt soleiðis, at sleppast kann inn á skúlaøkini við bussum. Eisini verða busslummar planlagdir.

**Íbindingin av Sambindingarvegnum í Marknagilsvegin sunnanfyri íbúðarblokkin við Janusargøtu**
Her verður talan um ein t-kross, sum verður stýrdur av intelligentum ferðsluljósum. Verandi íbinding frá vegnum undir Gráasteini er ikki haldbar, at tí at torført verður at sleppa inn og út á Marknagilsvegin.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Kirkjubøarvegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Landavegur**
Æltalin er at umbyggja verandi t-kross, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Íbindingarvegur frá Glasir**
Hetta vegamótið verður ein t-krossur, har ferðslan verður stýrd av intelligentum ferðsluljósum.

**Vegamótið Marknagilsvegur/Atkomuvegur til Dánjalstrøð**
Verandi vegamót verður í fyrstu syftu órørt. Tvs verandi T-krossur verur sum hann er í dag. (Umsitingin arbeiðir í planleggingarfasuni við einum sambingarvegi millum Marknagilsvegin og Oyggjarvegin)**.**

**Marknagilsvegurin frá t-krossinum við Dánjalstrøð og suður til t-krossin við endan á Kirkjubøarvegnum**
Neyðugt er at dagføra og tillaga nevnda vegastrekki, soleiðis at tað passar inn í planløgdu vegamótini, sum verða strýrd við ferðsluljósum. Tað snýr seg í stuttum um øking av vegabreiddini, soleiðis at tað verður pláss fyri høgra- og vinstrasvingsbanum, og vegabanum, sum ganga beint fram.

**Ljósreguleringar**
Umsitingin hevur havt fundir við umboð fyri ráðgevingarfyritøku, sum er serráðgevi og framleiðari av ferðslustýringum í sambandi við umlegging ferðsluni á Marknagilsvegum, vegamótinum Hvítanesvegur/Eystari Ringvegur og verandi ferðsluljósum í býnum. Hendan ráðgevandi fyritøkan er veitari av teimum trimum verandi ferðslustýrdu vegmótunum, sum eru í Tórshavnar kommunu.

Fundir millum umboð fyri ráðgevan og Tórshavnar kommunu hava verið í Tórshavn 2.- 3. og 4. mai.
Ferðslustýrdu vegamótini koma at tosa saman gjøgnum eina radarskipan, sum verður partur av teknisku loysnini, soleiðis at ferðslan kann ganga so ótarnað sum gjørligt. Til ber eisini at gera broytingar í sjálvari stýringini av ferðslustýringini gjøgnum fartelefon ella gjøgnum teldu, um hetta gerst neyðugt. Eisini verður møguligt hjá teknisku umsiting at fylgja við vegamótunum digitalt og visuelt. Møguleiki er eisini at fáa feilmeldingar gjøgnum sms og teldupost, soleiðis at feilir kunnu rættast uttan at fara á staðið.

**Ferðslusimuleringar**
Ferðslusimuleringar eru gjørdar og verða dagførdar eftir tørvi.

Mælt verður til, at veitingin og ráðgevingin í sambandi við ferðslustýrdu ljósini verður sum byggiharraveiting.
Arbeitt verður við at bjóða ráðgevingina í sambandi við entreprenørarbeiðið út 9. mai. 2017.

**Tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar**

| | | |
|---|---|---|
| Glasir | Heystið | 2018 |
| Nýggi musikkskúlin | Várið | 2019 |
| Skúlin á Fløtum | Heystið | 2020 |

Umbyggingin av Marknagilsvegnum saman við ferðslustýrdu vegamótunum nr. 3 og 4 og vegurin frá Marknagilsvegnum og oman í Janusargøtu verður liðugt gjørt til komandi summar. Víst verður til plantekning.

**Fíggjarlig viðurskifti**

**Fyribils kostnaðarmeting og gjaldsætlan**
Umsitingin hevur, saman við byggiharraráðgevanum, gjørt eina fyribils kostnaðarmeting og eina gjaldsætlan, hvussu arbeiðið kann verða raðfest yvir ár, soleiðis at tey planløgdu arbeiðini verða liðug til tíðina. Víst verður til omanfyri standandi tíðarætlan fyri skúlabyggingarnar.
Verandi ráðgevi hevur gjørt eina kostnaðarmeting av planløgdu arbeiðunum, sum eru fyri framman. Eisini er eitt kortskjal gjørt, har ein kostnaðarmeting er sett í rammu fyri hvørt arbeiðið sær.

**Viðkomandi skjøl í málinum**

| | |
|---|---|
| TK j. nr. 17/01246-3 | HMP-Consult_Kostnaðarmeting saman við einum kortskjali |
| TK j. nr. 16/02144-7 | Yvirlitskort av vegaføringum og vegamótum saman við Orthofoto |
| TK j. nr. 17/01245-2 | Kostnaðarmeting C og gjaldsætlan fyri nevndu arbeiðir |
| TK j. nr. 14/03118-68 | Notat frá Rambøll – Trafikafvikling Marknagil |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna fyriliggjandi prosjektuppskot, bjóða út ráðgevingararbeiðið at gera høvuðsprosjekt og útbjóðingartilfar og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mai 2017:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Bogi Andreasen og Marin Katrina Frýdal, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2017:** Ein meiriluti, Annika Olsen, Gunvør Balle og Turið Horn, tekur undir við teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Heðin Mortensen, tekur støðu á einum seinni fundi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 20. juni 2017:** Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Súsanna Olsen, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus og Gunvør Balle.

Atkvøddu blankt:
Annfinn Brekkstein, Halla Samuelsen, Tróndur Sigurðsson og Heðin Mortensen

**Ískoyti:**
Projektleiðslan fyri Skúlan á Fløtum mælir staðiliga til, at vegurin frá Marknagilsvegunum til Landavegin verður gjørdur beinanvegin.

Grundgevingin er at spreingjast skal fyri vegnum, kloakk og fjarhita, sum kann skaða bygningin, um hettar verður gjørt seinni. Enn eru bert fundament og veggir stoypt.

Vegaføringin er bert 20 m frá Skúlanum á Fløtum og nærri Musikkskúlanum, sum eisini er í gerð.

Tekniska umsitingin hevur, saman við ráðgevanum, mett um kostnaðin av at gera vegakassan heilt oman til Landavegin, soleiðis at hann kann brúkast til arbeiðsveg, at leggja kloakkleiðingar, og gera tað møguligt at føra fjarhitaleiðingarnar farm til til skúlan á Fløtum og Musikkskúlan. Metti kostnaðurin fyri hetta er 5,2 mió. kr. uttan MVG.

Yvirlit yvir ætlaða játtan verður tøkt til fundin í Fíggjarnevndini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við projektleiðsluni og mæla til at fáa eina eykajáttan á 6 mió. kr., fíggjað av tøkum peningi á tekniska økinum, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið. Eisini verður mælt til at arbeiðið verður boðið út beinan vegin, við tí treyt at fígging fæst.

**Tekniska nevnd 07. november 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 15. november 2017:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og játta 6 mió kr., ið verður fíggjað av lokaðum verkætlanum.

**Býráðsfundur 22. november 2017:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 14. desember 2017:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Í sambandi við atkomuviðurskifti við Glasir, er avrátt at av- og á skipan til Glasir skal skipast á teirra egna øki. Hendan ætlan ber í sær, at tal av parkeringsplássum minkar við umleið 30

plássum. Skotið verður upp at etablera tey mistu p-plássini á økinum omanfyri skúlan, (sí skitsu 01). Hettar økið er ogn hjá Tórshavnar kommunu og Føroya Handilsskúla.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin taka undir við at arbeitt verður víðari við uppskotinum og mæla til, at kommunan útvegar neyðugan part av lendinum burtur av matr. nr. 1101a.

**Tekniska nevnd 06. mars 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at umsitingin arbeiðir við eini endaligari parkeringsloysn sum umfatar alt økið.

**Ískoyti:**
Vísandi til samtyktina hjá teknisku nevnd, skal umsitingin arbeiða við einari endaligari parkeringsloysn, sum umfatar alt økið burturav matr. nr. 1101a, Tórshavn, sum liggur millum bygningin hjá Handilsskúlalanum og matr. nr. 1101b, Tórshavn. Neyðugt er tískil, at hesin parturin av matr. nr. 1101a, Tórshavn, verður lagdur av til parkeringsøki allur sum hann er.

**Tilmæli:**
Tekniski stjóri, kommunustjórin og leiðarin á stjórnarskrivstovuni mæla til at taka undir við teknisku nevnd og leggja tann í ískoytinum nevnda part av matr. nr. 1101a, Tórshavn, av til parkeringsøki sum liður í einari endaligari parkeringsloysn fyri økið kring Glasir.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Ískoyti:**
Komið er nú somikið áleiðis, at vegamótini sunnan- og norðanfyri Handilsskúlan skulu fremjast. Glasir tekur eftir ætlan nýggja skúlan í brúk komandi skúlaár og miðað verður ímóti at vegamótini tá eru liðug. Í tí sambandi er neyðugt at fáa arbeiðið boðið út og at keypa inn ferðsluljósini til bæði vegamótini.

Projekteringin er liðug og klárt er at bjóða arbeiðið út. Sí viðhefta skjal, Planur Marknagilsvegur, j.nr. 14/03118-85.

Ein fyribils kostnaðarmeting er gjørd av omanfyri nevnda arbeiði, áljóðandi kr. 4.300.000,- Ætlanin er, at kommunan sjálv keypir inn ferðsluljósini og at sjálvt vegarbeiðið verður boðið út í innbodnari licitatión.

Avsettar eru kr. 2.000.000,- til vegagerð í Marknagili í inniverandi ári. Framfluttar eru kr. 6.426.000,- frá 2017. Samlaða játtanin er sostatt kr. 8.426.000,- Av hesum skulu kr. 4.030.000,- til vegagerð fram við skúlanum á Fløtum.

Mett verður at alt arbeiðið kann fremjast fyri játtanina í ár.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at arbeiðið verður boðið út, og at kommunan keypir og fær til vega ferðsluljós til vegamótini.

**Tekniska nevnd 08. mai 2018:** Samtykt at taka undir  við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Eftir samtyktina í Teknisku nevnd 08.mai 2018, skuldi málið verið beint í Býráðið umvegis Fígggjarnevndina. Tað koma tað av misgávum ikki, hetta verður við hesum gjørt.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtanin á kr. 2 mió. til endamalið verður flutt av L00001 yvir á verkætlanina L81018 og málið verður beint í Býráðið.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og fýra blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Turið Horn, Jákup Dam, Bogi Andreasen, Ruth Vang og Bjørghild Djurhuus.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Helena Dam á Neystabø, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein og Bjørg Dam.

**Ískoyti:**
Sum lýst omanfyri, samtykti tekniska nevnd á fundi tann 8. mai 2018, at arbeiðið við at betra um umstøðurnar við Marknagilsvegnum skuldi bjóðast út og at keypt verða inn ferðsluljós til tey bæði vegamótini, sum hava við atkomuviðurskiftini hjá Glasi at gera.

Ferðsluljósini eru bíløgd og koma tey til landið síðst í august og verða tá eftir ætlan uppsett.

Vegaprojektið hevur verið boðið út í tveimum umførum og er lægsta tilboð 10,7 mió. kr. uttan MVG. Afturat hesum skal roknast við óvæntaðum og projekteringsútreiðslum, eins og uppsetan av ferðsluljósum. Samlað kemur hendan verkætlanin at kosta góðar 13 mió. kr.

Tøkur peningur til verkætlanina er p.t. kr. 5.392.000,-. Av hesari upphædd skulu brúkast kr. 2.787.000,- til vegarbeiði sum er ígongd og til ferðsluljósini. Eftir av játtanini eru sostatt **kr. 2.600.000,-** Sí talvu niðanfyri.

Um verkætlanin skal fremjast, krevur tað at neyðugur peningur er tøkur til endamálið. Hettar kann gerast við flyting millum konti og eini eykajáttan.

| | **Upphædd** |
|---|---|
| Kostnaður í alt | 13.300.000 |
| Tøk upphædd á L81018 (8175) | -2.600.000 |
| | 10.700.000 |
| Fíggjast av L00002 (8175) | -6.636.000 |
| At fíggja av konto 6175 | 4.064.000 |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at arbeitt verður víðari við verkætlanini, at tikið verður av tilboðnum og at peningurin til verkætlanina verður fingin til vega við at fluttar vera kr. 6.636.000 frá L00002 til L810018 og at fíggja restina, kr. 4.064.000 av konto 6175, sum ein eykajáttan.

Málið viðvíkjandi eykajáttan á kr. 4.064.000 av konto 6175 verður umvegis teknisku- og fíggjarnevnd beint í Býráðið, har tað krevur 2 viðgerðir.

**Tekniska nevnd 14. august 2018:** Ein meiriluti, Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Bogi Andreasen, samtykt at taka undir við tilmælinum.
Ein minniluti, Annfinn Brekkstein, stemmar blankt.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Ein meiriluti, Gunvør Balle, Jákup Dam og Bergun Kass, taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Helena Dam á Neystabø, atkvøða blankt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri, einari ímóti og 4 blonkum.
Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Gunvør Balle, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Bogi Andreasen, Bergun Kass og Kaj Leo Holm Johannesen.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson

Blankt atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø og Halla Samuelsen.

## 194/18 Umsókn um keyp av øki burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík til bygging av einum biogassanleggi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 11.04.2018 | 73/18 | 18/00908-5 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.04.2018 | 94/18 | 18/00908-5 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 110/18 | 18/00908-5 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 93/18 | 18/00908-5 |
| 5 Fíggjarnevndin | | | 18/00908-5 |
| 6 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 194/18 | 18/00908-5 |

**Lýsing av málinum – samandráttur**
Við skrivi 22.03.2017 søkir Christian Andreasen, advokatur, vegna P/f Salmon Protein um, at felagið fær til keyps umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík.

Ætlanin er at nýta stykkið til bygging av einum biogass anleggi, sum skal taka ímóti úrdráttum frá alivinnuni, sambært teimum reglum, sum eru galdandi fyri alivinnuna viðvíkjandi burturbeining av lívrunnum tilfari, og tøðum frá føroyskum bóndum.

Burtur úr tilfarinum, sum verður viðgjørt/avgassað, verður útvunnin hiti, sum skal latast til Fjarhitafelagið, umframt at veita streym til SEV.

Samstundis er ætlanin, at bøndur skulu fáa latna tilfarið aftur sum avgassað tøð. Hetta gevur bóndum møguleika fyri at taða oftari, og uttan at taðingin hevur við sær keðilig umhvørvisárin, sum annars er galdandi fyri taðing við vanligum tøðum.

Við at byggja nevnda biogassanlegg fáa alarar tann fyrimun, at teir sleppa av við lívrunnið burturkast, samstundis sum bøndur sleppa av við sítt avfall.

Bygging av einum slíkum anleggi er fult í tráð við ætlanina hjá landi og kommunum at útvinna mest møguligt av grønari orku, samstundis sum hetta tiltak vil verða til stóran frama fyri umhvørvið sum heild.

Umsøkjarin ynskir at fáa grundøkið til keyps fyri ein keypspening sum svarar til kostprísin.

Um neyðugt er at broyta byggisamtyktina, fyri at byggja nevnda anlegg á økinum, verður samstundis biðið um, at byggisamtyktin fyri økið verður broytt.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Matr. nr. 139b á Skarðshjalla liggur í umráðispartinum B8 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, har ásetingarnar sambært kap. 4, §15 eru:

- Loyvt er einans at byggja hús til vinnuvirkir, her undir umsitingar- og tænastuvirki, verksmiðjur, goymslur og tílíkt og til tænastuvirksemi, ið hevur samband við hesi.
- Virkini í hesum umráðispartinum skulu kunna flokkast í umhvørvisflokkunum 4 til 6 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

Umhvørvisflokkur 6: Umfatar virkir, ið hava størri ávirkan á sítt nærmasta umhvørvi. Kunnu staðsetast í størri ídnaðarøki, har fráleikið til grannar kann haldast. Eisini kann staðsetingin

verða í vinnuøkjum, har bert virkir við serligum fráleikatørvi liggja. Virkir í hesum flokkinum eru størri maskin- og betongvirkir, sláturvirkir og asfaltvirkir. Minsta frástøða til bústaðir fyri henda flokk er 300 metrar.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Matr. nr. 139b, sum umsøkjarin biður um at fáa til keyps, er innasta økið á Skarðshjalla.
Biðið verður um at fáa 20.000 m² og er tað alt økið sum er eftir innanfyri tað síðstu útstykkingina á Skarðshjalla.

Skal kommunan selja økið til P/f Salmon Protein, so krevur tað loyvi frá Landsstýrinum, tí talan er um eitt øki sum er størri enn 300 m², sum verður selt uttan útboð.

Í staðin fyri at selja, so kann kommunan geva felagnum optión uppá økið í eitt tíðarskeið. Soleiðis tryggjar kommunan sær, at um biogass anleggið ikki verður bygt, so kemur kommunan framhaldandi at ráða yvir økinum, sum kann latast til bygging av nýggjari brennistøð ella annað.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið:**
Eitt øki skal eisini finnast til at byggja eina nýggja framtíðar brennistøð, møguliga fyri alla Føroyar, sum eisini kann lata hita til Fjarhitafelagið og møguliga streym til SEV.

Um økið á Skarðshjalla verður latið til biogass anlegg, so skal eitt annað øki finnast til nýggja brennistøð, tað kundi verið á Ovara Hjalla.

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum:**
Av tí at onki projekt fyriliggur, so ber ikki til at siga um ætlanin krevur frávik/lættar frá ásetingunum.

Umsóknin er helst í tráð við ásetingarnar fyri økið, men tað skal kannast nærri, tá fleiri upplýsingar fyriliggja.

Skal biogass anlegg byggjast á staðnum, so er talan um eitt kap. 5 virki, sum krevur umhvørvisgóðkenning.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 6

**Fíggjarlig viðurskifti:**
Tórshavnar kommuna eigur lendið sum søkt verður um.

**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

**Tekniska deild:**
Býarverkfrøðingurin hevur verið við til at lýsa málið.

**Býarskipanardeildin:**
Í sambandi við ídnaðarvirksemið á Skarðshjalla, so er skilagott at staðseta eitt nýtt biogass anlegg innast á økinum, hetta eisini í sambandi við eina møguliga útbygging/flyting av brennistøðini, ið somuleiðis er eyðsædd at verða staðsett tætt við biogass anleggið. Eftir ætlan verður ídnaðarøkið á Hjalla víðkað omanfyri verandi virksemið, ið leggur upp til fleiri grundøki og møguleikar til vinnu og ídnað.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Tá myndugleikaprojekt fyriliggur, skal málið sendast til:
- Umhvørvisstovuna í sambandi við umhvørvisgóðkenning
- Arbeiðs- og brunaeftirlitið

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- Umsókn frá Christian Andreasen, j.nr. 18/00908-2

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á byggi- og umhvørvisdeildini mæla til:
at kommunan gevur P/f Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr.nr. 139b, Hoyvík, til staðseting av nýggjum biogass verki.
at optiónin verður treytað av, at áðrenn endaligt keyp ferð fram, skal tilsøgn um byggiloyvi fyriliggja, umframt avtala um veiting av framleiddari orku, m.a. til fjarhitafelagið.
at beina málið í fíggjarnevndina, til at áseta aðrar treytir, m.a. um kostnað og tíðarætlan.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 11. apríl 2018:** Útsett.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og geva P/F Salmon Protein optión í 2 ár uppá at keypa umleið 20.000 $m^2$ burtur av matr. nr. 139b, Hoyvík við omanfyristandandi treytum og til kostnað, ið verður at áseta við støði í kostnaðinum av teirri byggibúning, sum er gjørd á lendinum. Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Einmælt samtykt.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið av skrá.

## 195/18 Kiosk Náttaravnurin í Steinatúni.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.03.2017 | 55/17 | 17/00946-3 |
| 2 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.05.2017 | 99/17 | 17/00946-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.06.2017 | 139/17 | 17/00946-3 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 07.02.2018 | 22/18 | 17/00946-3 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 15.08.2018 | 171/18 | 17/00946-3 |
| 6 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 237/18 | 17/00946-3 |
| 7 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 195/18 | 17/00946-3 |

**Málslýsing:**
Seinastu árini hevur kiosk Náttaravnurin verið rikin í Steinatúni sum pylsubú/matstað og hevur bert havt opið um næturnar í vikuskiftinum.

Sum skilst hevur verið trupult at fingið raksturin at borið seg í dagtímunum.

Verandi leigari av kioskini hevur boðað frá, at hann ynskir at gevast við sínum virksemið.

Hann yvirtók leigumálið í 2015, og keypti rakstrargøgn og goymslu frá táverandi leigara. Síðani hevur hann eisini málað og snøggað bygningin.

Leigarin ynskir at virksemið kann halda fram við nýggjum leigara, sum eisini kann yvirtaka rakstrargøgnini.

Nú verandi leigari hevur boðað frá at hann ætlar at gevast, er helst rætta løtan til at endurskoða leigumálið. Um man ynskir at hava bygningin standandi har, og í sofall, hvørji krøv sum skulu vera til leigumálið.

Tað tykist sum um at tað er trupult at fáa raksturin at bera seg í hesum lítlu hølunum, og eru sannlíkindini eisini minni fyri góðum rakstri, um kommunan setur ov nógv krøv, sum viðføra øktar útreiðslur fyri leigaran.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og leiðarin í løgdeildini, mæla til at beina málið í byggi og býarskipanarnevndina, at viðgera spurningin um framhaldandi virksemið í bygninginum.

**Fíggjarnevndin 22. mars 2017:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Økið við Steinatún ber bráð av nógvari ferðslu, og er Steinatún sermerkt sum ein livandi býarlummi og terminalur í miðbýnum, har fólk ferðast til og frá. Ein liður í at styrkja sambandið millum Steinatún og miðstaðargøtuna Niels Finsens gøtu varð gjørt við at opna niðastu hæddina í bankabygninginum út ímóti torginum frammanfyri. Torgið vendir sær í fleiri ættir, og tískil er bygningurin hjá Náttarravnum væl staðsettur í býarskipanarligum høpi, tí hann stuðlar undir økið við at virka sum eitt snúningspunkt og bindilið ímillum torgið og mistaðargøtuna.

Skapið á bygninginum leggur upp til eina rørslu rundan um bygningin, men í dag er bert opið út ímóti Niels Finsens gøtu. Av tí at fólk ferðast rundan um bygningin, er eyðsætt at opna bygningin upp á fleiri síðum.

Bygningurin hóskar í dag ikki serliga væl til umhvørvið, tí átti ein umvæling farið fram, soleiðis at bygningurin gerst ein tíðarhóskandi liður í heildini á økinum. Ein umvæling er mett at kosta áleið 1 mió.kr.

Ein trupulleiki í dag er, at bygningurin stendur tómur uttan virksemi í dagtímunum. Fleiri hava roynt seg við kiosk virksemi í miðbýnum, men hevur tað víst seg at bera illa til. Men hugsast kann, at endurnýggjanin av økinum broytir gomul viðurskifti, tí nógv fólk síggjast á gøtuni í dag.

Ein terminalur leggur upp at virksemið í einum tílíkum bygningi serliga vendir sær til brúkaran í økinum við eini hvørjari tænastu ella sølu. Av tí at Smyrjibreyðsbúðin liggur á miðstaðargøtuni kundi í hesum føri eisini verið talan um café virksemi við uttandura borðreiðing. Í tráð við hugsanina í miðbýarætlanini skal virksemið vera útvent, og ynskiligt er, at virksemi er í bygninginum allar dagar í vikuni, umframt at møguleiki er at hava opið nætur og vikuskifti. Sostatt kann talan verða um blandað útvent virksemi, sum vendir sær til brúkaran í økinum dagtímarnar allar dagar í vikuni, umframt um kvøld/næturnar í vikuskiftinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða virksemið út sambært omanfyri lýsing av hvat virksemi egnar seg í økinum og at beina málið aftur í fíggjarnevndina. Harumframt verður mælt til, at ein dagføring av bygninginum verður raðfest skjótast gjørligt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. mai 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti**
Royndirnar við leigumálinum í hesum hølunum og leigumálinum viðvíkjandi kiosk Steinatúni eru, at dagvirksemi er trupult at fáa at bera seg og tí hevur slíkt virksemi ikki verið í økinum í fleiri ár.

Verður hugt at londum uttanum okkum, so eru lítlar kioskir o.t. stórt sæð burtur úr býarmyndini. Hetta sannlíkt vegna broyttu kappingina m.a. tí handlar hava longri opið.

Kring Steinatún eru fleiri handlar, sum eisini selja kioskvørur, og sum hava opið til seint á kvøldi, ma. Mylnan og FK og nakað longri frá eru SMS og Á-handilin.

Út frá hesum verður mett, at tørvur er á einari neyvari viðgerð av støðuni innan avgerð verður tikin um, hvat skal henda við bygninginum og á økinum sum heild.

Meðan málið verður viðgjørt, kann bygningurin við fyrimuni verið útleigaður við verandi treytum men við stuttari uppsagnarfreist, vísandi til at kommunan kannar hvat skal henda við bygninginum.

**Tilmæli**
Kommunustjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til, at meðan málið verður viðgjørt at leiga ognina út við verandi treytum og við 3 mánaðar uppsagnarfreist.
Fíggjarnevndin 14. juni 2017: Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kioskin Náttarravnurin hóskar ikki serliga væl inn í umhvørvið í Steinatúni í dag. Økið er broytt nógv seinastu tíðina og býarmyndin er vorðin ein onnur. Sum framhald av verkætlanini í Steinatúni verður nú nýtt bussskýli framleitt og sett upp í næstum. Nýggja bussskýlið er staðsett á torginum frammanfyri høvuðsbygningin og liggur tætt upp at kioskini, sum als ikki fara at hóska saman, bæði tá hugsað verður um útsjónd og skap.

Verandi leigari ynskir framvegis at gevast við sínum virksemi, og at virksemið kann halda fram við nýggjum leigara, sum eisini kann yvirtaka rakstrargøgnini. Fundur hevur verið við verandi leigara og hann, ið ynskir at yvirtaka verandi sáttmála við somu treytum. Talan verður um áleið sama virksemi sum higartil, søla av lættari mati, har opið verður nætur um vikuskiftini, umframt at nýggi leigarin vil royna at hava opið partar av gerandisdøgunum, um hetta kann lata seg gera. Ætlanin er ikki at byggja kioskina um, men møguliga at gera onkrar smávegis ábøtur.

Viðmerkjast kann, at verandi leigari yvirtók leigumálið frá sp/f Náttarravnarnir, har ætlanin var at keypa partafelagið við leigumáli. Tað vísti seg, at hesin háttur ikki var nøktandi fyri táverandi leigara av skattligum ávum. Loysnin varð, at sáttmálin varð yvirtikin og goymsla og rakstrargøgn vóru keypt frá sp/f Náttarravnarnir fyri kr. 27.000 í alt. Verandi leigari hevur málað og snøggað um bygningin, men hevur húsaumsitingin goldið útreiðslurnar.

Harafturat hava aðrir víst áhuga fyri kioskini, har talan somuleiðis er um sølu av mati, men við hægri góðsku, men verður ynskt at fleiri ábøtur verða gjørdar, um hetta skal lata seg gera.

Í einum býarskipanarligum høpi er kioskin í dag ikki ein liður í heildarmyndini á økinum, og skal hon gerast ein partur av býarmyndini, so krevst ein umvæling ella kanska nærri ein umbygging fyri at hóska væl saman við nýggja ætlaða bussskýlinum á økinum, ið er staðsett tætt upp at kioskini. Bygningurin stendur framvegis tómur uttan virksemi í dagtímunum, og skapar hetta ikki nógv býarlív í gøtuni, og hevur tað víst seg at bera illa til at fáa kiosk virksemi at virka í miðbýnum, nú fleiri handlar og matstovur eru komnar um somu leiðir. Einki søguligt ella byggilistarligt virði er í kioskini, tískil mælir umsitingin til at taka kioskina/bygningin niður og at leggja flísar á, har kioskin stendur.

**Skjøl**
Myndir av kioskini. Náttarravnurin. journal nr. 17/00946-2
Bussskýlið í Steintúni, journal nr. 17/00946-7

**Tilmæli:**
Virkandi býararkitekturin og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka bygningin niður, at játta kr. 30.000 av konto 6110 til niðurtøku, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.
**Byggi- og býarskipanarnevndin 07. februar 2018:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Verkætlanin "Steinatún" verður framd í trimum byggistigum, og er ætlanin at taka virksemið, sum er í kioskini, við í heildarætlanina fyri Steinatún, tá farið verður undir at skipa triðja og seinasta byggistigið í verkætlanini. Seinasta byggistigið fevnir um bygningarnar og økið hinumegin hálvtakið og býartorgið, sum er verkætlan sett í gongd.

Ein møgulig niðurtøka av kioskini hevði farið fram í sambandi við uppsetanina av hálvtakinum á býartorginum í Steinatúni.

**Tilmæli:**
Virkandi tekniski stjórin, virkandi býararkitekturin og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka bygningin niður, at játta kr. 30.000 av konto 6110 til niðurtøku, og at beina málið í fíggjarnevndina og býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 15. august 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Einmælt samtykt.

## 196/18 Nýggjur skúli í vesturbýnum (2012-1064)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 24.06.2014 | 151/14 | 14/03408-18 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.06.2014 | 203/14 | 14/03408-18 |
| 3 Býráðsfundur | 25.06.2014 | 148/14 | 14/03408-18 |
| 4 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 207/14 | 14/03408-18 |
| 5 Mentamálanevndin | 11.02.2015 | 22/15 | 14/03408-18 |
| 6 Mentamálanevndin | 06.05.2015 | 72/15 | 14/03408-18 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2015 | 117/15 | 14/03408-18 |
| 8 Mentamálanevndin | 19.10.2015 | 209/15 | 14/03408-18 |
| 9 Tekniska nevnd | 20.10.2015 | 112/15 | 14/03408-18 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 20.10.2015 | 199/15 | 14/03408-18 |
| 11 Býráðsfundur | 21.10.2015 | 173/15 | 14/03408-18 |
| 12 Fíggjarnevndin | 21.10.2015 | 236/15 | 14/03408-18 |
| 13 Fíggjarnevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 14 Býráðsfundur | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 15 Mentamálanevndin | 06.01.2016 | 1/16 | 14/03408-18 |
| 16 Býráðsfundur | 28.01.2016 | 12/16 | 14/03408-18 |
| 17 Mentamálanevndin | 10.02.2016 | 24/16 | 14/03408-18 |
| 18 Fíggjarnevndin | 17.02.2016 | 52/16 | 14/03408-18 |
| 19 Býráðsfundur | 25.02.2016 | 38/16 | 14/03408-18 |
| 20 Mentamálanevndin | 04.05.2016 | 133/16 | 14/03408-18 |
| 21 Fíggjarnevndin | 11.05.2016 | 158/16 | 14/03408-18 |
| 22 Býráðsfundur | 19.05.2016 | 128/16 | 14/03408-18 |
| 23 Fíggjarnevndin | 08.06.2016 | 222/16 | 14/03408-18 |
| 24 Býráðsfundur | 16.06.2016 | 162/16 | 14/03408-18 |
| 25 Mentamálanevndin | 17.10.2016 | 273/16 | 14/03408-18 |
| 26 Mentamálanevndin | 27.10.2016 | 275/16 | 14/03408-18 |
| 27 Fíggjarnevndin | 27.10.2016 | 364/16 | 14/03408-18 |
| 28 Býráðsfundur | 27.10.2016 | 247/16 | 14/03408-18 |
| 29 Fíggjarnevndin | 16.11.2016 | 367/16 | 14/03408-18 |
| 30 Mentamálanevndin | 24.11.2016 | 300/16 | 14/03408-18 |
| 31 Fíggjarnevndin | 29.11.2016 | 396/16 | 14/03408-18 |
| 32 Býráðsfundur | 30.11.2016 | 297/16 | 14/03408-18 |
| 33 Býráðsfundur | 15.12.2016 | 323/16 | 14/03408-18 |
| 34 Mentamálanevndin | 06.12.2016 | 312/16 | 14/03408-18 |
| 35 Fíggjarnevndin | 07.12.2016 | 404/16 | 14/03408-18 |
| 36 Býráðsfundur | 26.01.2017 | 44/17 | 14/03408-18 |
| 37 Býráðsfundur | 02.03.2017 | 71/17 | 14/03408-18 |
| 38 Býráðsfundur | 27.04.2017 | 120/17 | 14/03408-18 |
| 39 Mentamálanevndin | 24.04.2017 | 89/17 | 14/03408-18 |
| 40 Fíggjarnevndin | 26.04.2017 | 103/17 | 14/03408-18 |
| 41 Mentamálanevndin | 14.05.2018 | 158/18 | 14/03408-18 |
| 42 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 140/18 | 14/03408-18 |
| 43 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 115/18 | 14/03408-18 |
| 44 Fíggjarnevndin | 13.06.2018 | 190/18 | 14/03408-18 |
| 45 Mentamálanevndin | 18.06.2018 | 232/18 | 14/03408-18 |
| 46 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 205/18 | 14/03408-18 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 47 Mentamálanevndin | 02.07.2018 | 238/18 | 14/03408-18 |
| 48 Fíggjarnevndin | 04.07.2018 | 217/18 | 14/03408-18 |
| 49 Býráðsfundur | 04.07.2018 | 174/18 | 14/03408-18 |
| 50 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 196/18 | 14/03408-18 |

## Málslýsing:

**2012-1064/17 SG**

**Fyrireika bygging av nýggjum skúla**

Arbeiðsbólkur og arbeiðssetningur
Í álitinum um skúlabygnað og skúlabygging 2012-2021 (sí mál 2011-0679), sum skúlastýrini eisini hava viðgjørt og gjørt viðmerkingar til, verður m.a. mælt til at byggja nýggjan trý sporaðan skúla í staðin fyri Tórshavnar kommunuskúla og Venjingarskúlan. Mælt verður eisini til at skipa forskúla og frítíðarskúla í øllum skúlum. Haraftrat er lagt upp til at hava tilboð til næmingar við serligum avbjóðingum.

Hesin nýggi skúlin hevur arbeiðsheitið Vesturskúli við tað, at hann ætlandi verður staðsettur í Vesturbýnum inn frá Landavegnum, har økið eisini er lagt av til at byggja ítróttahøll. Inn frá Marknagilsvegnum verður miðnámsskúladepilin granni.

Tørvur er á at gera uppskot til eitt meira útgreinað konsept bæði um samlaða virksemið í skúlanum og bygningin sjálvan. Hetta arbeiðið er at meta sum ein fyrsta fyrireiking og hugskotsgrundarlag fyri víðari politiskari viðgerð og støðutakan til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá v.m.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at geva umsitingini heimild til at seta arbeiðsbólk við umboðum fyri umsitingina, skúlarnar, frítíðarskúlarnar og møguliga onnur at gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlanum at lata mentamálanevndina aftur til viðgerðar í seinasta lagi 15. juni 2012.

**Mentamálanevndin 30. apríl 2012:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 2. mai 2012:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
Arbeiðsbólkurin hevur latið gera uppskot til yvirskipað konsept fyri nýggja skúlan, sí frágreiðing. Arbeiðsbólkurin hevur m.a. lýst námsfrøðiliga profilin við atliti at eitt nú ætlanini um deildarbýti, floks- og hølisbýti, samstarv millum lærarar og pedagogar, samstarv millum skúlar, serundirvísing og næmingatrivnað. Harumframt verður nomið við staðsetingina, bygningsstødd v.m.

Konseptið er í góðum samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging eins og viðmerkingarnar frá skúlastýrunum (máltal 2011-0679).

Mett verður, at tilfarið, ið arbeiðsbólkurin hevur latið úr hondum, saman við álitinum um skúlabygnað og skúlabygging og viðmerkingunum frá skúlastýrunum er haldgott grundarlag

fyri at fara víðari í tilgongdini at fyrireika bygging av nýggjum Vesturskúla. Næsta stigið er sostatt at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá.

Til endamálið skal fígging fáast til vega. Í sambandi við heildarætlanina fyri Kommunuskúlan eru uml. 3 mió kr. ikki brúktar. Nýggi Vesturskúlin er ein samanlegging av Kommunuskúlanum og Venjingarskúlanum, og tí verður mett, at hesir pengar kunnu játtast og flytast til nýggju skúlaætlanina fyri hesar báðar skúlar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at seta bygginevnd og at útvega byggiskrá til nýggjan Vesturskúla í samsvari við álitið um skúlabygnað og skúlabygging, og at áður játtað upphædd kr. 3 mió frá kontu 4175 Dagføring av skúlum L41003 Kommunuskúlin høvuðsumvæling verður flutt til bygging av nýggjum Vesturskúla.

**Mentamálanevndin 27. juni 2012:** Ein meiriluti: Jógvan Arge, Halla Samuelsen og Elin Lindenskov taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.
Ein minniluti: Annfinn Brekkstein og Vagnur Johannesen taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 28. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 10. apríl 2013:** Málið varð umrøtt.

**Ískoyti:**
Ein arbeiðsbólkur við umboðum fyri leiðslur, lærarar og foreldur í skúlastýrunum í Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og umboðum fyri umsitingina (sí mál nr. 14/00423) hevur gjørt uppskot um bygnaðarliga samskipan og samanlegging av Venjingarskúlanum og Tórshavnar Kommunuskúla og tíðarætlan.

Á býráðsfundi 22. mai 2014 varð samtykt at broyta ætlaða talið av sporum í Vesturskúlanum soleiðis, at trý spor vera í yngru flokkunum og fimm spor í 8. og 9. flokki (sí mál nr. 14/00423).

Grundøkið við Landavegin, sum ætlanin er at byggja skúlan á, er 34.000 $m^2$, til samanberingar eru grundøkini hjá Skúlanum við Løgmannabreyt og Skúlanum á Argjahamri ávikavist 22.000 $m^2$ og 20.000 $m^2$.

Bygginevndin hevur viðgjørt uppskotið, sum ein arbeiðsbólkur læt úr hondum í juni 2012, og nevndin er samd um, at tað uppskotið er gott grundarlag at brúka í fyrireikingini at byggja nýggja skúlan í vesturbýnum.
Á fundi mikudagin 18. juni 2014 samtykti bygginevndin at biðja um, at 1.300.000 kr., sum settar eru av til av Vesturskúla, verða játtaðar til fyrireiking og til byggiskrá.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 1.300.000 kr. til fyrireiking og útvegan av byggiskrá av konto 4176 Nýbygging av skúlum.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Einmælt samtykt.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Støðan í dag.

Tøkt lendi, sum ætlanin er at byggja á:

| | | |
|---|---|---|
| Matr.nr. | 1099 | 14.660 m² |
| Matr.nr. | 1100 | 15.280 m² |
| Matr.nr. | 1102c | 5.879 m² |
| | | |
| Tilsamans | | 35.819 m² |

Hesir matriklar eru allir D3-øki Almennir stovnar.

Samtykt er, at skúlin skal byggjast til 850 næmingar, og við grundarlagi í verandi skúlum við Løgmannabreyt og á Argjahamri eru umleið 14 m² fyri hvønn næming.
Nýggi skúlin skal sostatt vera 850 x 14 m² = 11.900 m² til støddar.

Neyðugt er at útvega meiri lendi, tí serstaka byggisamtyktin fyri Marknagil ásetur nettonýtslustig 0,3, sum krevur eitt grundøkið uppá 39.700 m².

Ætlanin er at nýta matr.nr. 1104d ella partar av hesum matrikli afturat. Kommunan eigur grundøkið, sum er 6.576 m² til støddar.

Soleiðis verður samlaða víddin økt úr 35.819 m² til 42.395 m².

Bygginevndin hevur á fundi 11. desember 2014 samtykt at mæla til, at matr.nr. 1104d verður lagt afturat samlaða økinum til Vesturskúlan.

Upplýsast skal, at matr.nr. 1104d er C3-øki Miðstaða- bústaðarbygging.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur fingið 1.part av byggiskránni (Byggiskrá Fyritreytir) og mælir til at góðkenna hana við tí fyrivarni, at smærri tillagingar kunnu verða gjørdar av umsitingingini, áðrenn útbjóðað verður.

Víst verður til skjal 15/01528-2, sum er viðfest.

Sambært tíðarætlanini verða 2. og 3. partur av byggiskránni lidnir í september. 2. partur er námsfrøðilig viðurskifti og 3. partur er teknisk viðurskifti.

**Tilmæli til mentamálanevndina:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og góðkenna fyrsta part av byggiskránni.

**Ískoyti:**
Eftir at málið var fyri í mentamálanevndini, hevur fundur verið á teknisku deild við luttøku av umboðum fyri Landsverk og Rambøll um atkomuviðurskiftini til Vesturskúlan. Niðurstøðan frá fundinum var, at Rambøll skuldi koma við einum uppskoti til loysn og gera eina innkoyring frá Marknagilsvegnum ígjøgnum nevnda matr.1104d.
Mál 14-03118-22. Hjáløgdu kort sum vísa uppskot til loysn.

**Tilmæli til byggi- og býarskipanarnevndina:**
Tekniski stjórin og verkætlanarleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini og teknisku deild og nýta matr. nr. 1104d fyri at halda kravið um nettunýtslustig til byggingina og møguligan atkomuveg frá Marknagilsvegnum til Vesturskúlan.

**Mentamálanevndin 6. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til mentamálanevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til byggi- og býarskipanarnevndina.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur 12. oktober 2015 samtykt endaliga byggiskrá fyri byggiverkætlanina Skúlin á Fløtum. Byggiskráin, ið er hjáløgd, er í trimum pørtum:

1. Fortreytir
2. Námsfrøðilig viðurskifti
3. Teknisk viðurskifti

**Grundøki**
Eitt øki í Marknagili er lagt av til Skúlan á Fløtum www.saf.fo . Økið er tilsamans 42.335 $m^2$ og er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

Sambært serstøku byggisamtyktini fyri Marknagil kunnu bygningurin/bygningarnir í mesta lagi vera 10.583 $m^2$ við tilsamans 12.700 innrættaðum $m^2$. Støddin á skúlanum verður 11.600 $m^2$ við møguleika at byggja út til tveir flokkar aftrat í 7. árgangi.

**Kostnaður**
Metta samlaða íløgan til handverkaraútreiðslur uttan meirvirðisgjald verður:
11.600 $m^2$ av gólvvídd fyri 11.600 $m^2$ x 20.000 kr.= 232.000.000 kr.

**Tíðarætlan**
Byggingin verður skipað sum ein bygging í trimum byggistigum. Sambært tíðarætlanini verður fyrsta byggistig liðugt í juli 2018, og tá flytur miðdeildin (4.- 6-fl.) inn í skúlan. Annað byggistig er til hádeildina (7.-9.fl.), og tað verður liðugt í juli 2019. Í juli 2020 verður triðja byggisstig liðugt, og tá flytur grunddeildin (0-3- fl. og frítíðarskúli) inn í skúlan.

Málið verður viðgjørt í mentamálanevndini, tekniskunevnd, byggi- og býarskipanarnevndini, fíggjarnevndini og í býráðnum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjóri og býararkitekturin mæla mentamálanevndini til at góðkenna byggiskránna og at beina málið víðari til teknisku nevnd, ið skal beina málið víðari til byggi- og býarskipanarnevndina, ið skal beina málið umvegis fíggjarnevndina í býráðið.

**Mentamálanevndin 19. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í avvarðandi nevndir.

**Tilmæli:**

Tekniski stjórin mælir til at nevndin tekur undir við byggiskránni fyri tann partin sum viðkemur vegaføringar, ferðsluviðurskiftir og leiðingar í sambandi við verkætlanina, og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Timæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við byggiskránni, fyri tann partin, sum viðkemur býarskipan og staðseting, og at beina málið í býráðið umvegis Fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. oktober 2015:** Samtykt at taka undir við tilmælinum. Halla Samuelsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 21. oktober 2015:** Samtykt at góðkenna byggiskránna og at beina málið í býráðið, og heitt verður samstundis á teknisku nevnd um í góðari tið at skipa øll nøktandi vega- og ferðsluviðurskifti við skúlarnar.

**Býráðsfundir 21. oktober 2015:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at góðkenna byggiskránna.

**Ískoyti**
Hugskotskappingin fyri Skúlan á Fløtum var útskrivað 23. oktober 2015 eftir at Tórshavnar býráð 21. oktober 2015 hevði samtykt byggiskránna fyri Skúlan.

Fýra ráðgevaratoymi vóru undangóðkend til at luttaka í hugskotskappingini.

Tey vóru:
- Elvi (Selmar Nielsen Arkitektar, Ósbjørn Jacobsen Arkitektar, LBF og SMJ)
- BIGKONTRAST (BIG-Bjarke Ingels Group, Kontrast byggilist og byggifrøði, LBF, SMJ)
- Árni Winter arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF
- MAP Arkitektar, Arkitektar 99, LBF og PB-Consult

18. desember 2015 lótu toymini inn síni boð uppá loysn og var tað latið navnloynt soleiðis, at nevndin ikki visti, hvat toymið átti hvat uppskot.

4. januar 2016 hevur dómsnevndin gjørt úrskurð og tilmæli í málinum um, hvat ráðgevaratoymið skal fáa møguleikan at innganga avtalu um ráðgeving, projektering og eftirlit av skúlabyggingini. Sí hjálagt dómsúrskurðin.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin og býararkitekurin mæla mentamálanevndini til at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og at heimila umsitingini til at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið í dómsúrskurðinum um projektering og eftirlit, og at venda aftur við einum uppskoti til sáttmála.

**Mentamálanevndin 6. januar 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 06. januar 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 06. januar 2016:** Einmælt samtykt at staðfesta úrskurðin hjá dómsnevndini og heimila umsitingini at fara undir samráðingar við vinnandi ráðgevaratoymið: Árni Winther arkitektar, ZETA architects, SMJ og LBF og uppskoti teirra, Eindirnar í heildini.

**Býráðsfundur 28. januar 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur á fundi 9. februar 2016 samtykt samráðingarúrslitið frá samráðingunum hjá samráðingartoyminum (umboð frá bygginevnd og teknisku fyrisiting) við vinnandi ráðgevaratoymið í hugskotskappingini. Talan er um samtak, ið eitur Samtakið Eind Í/F (undir stovnan).

Hjálagdur er uppskot til sáttmála við tilhoyrandi fylgiskjølum.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla til at heimila umsitingini til at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F.

**Mentamálanevndin 10. februar 2016:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Jógvan Arge, fílist á, at tilmælið við tilfari kom ikki fyrrenn á sjálvum fundinum og tekur ikki støðu til málið í dag.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2016:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og at innganga hjáløgdu ráðgevaraavtalu við Samtakið Eind Í/F og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 25. februar 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Verkætlanin er komin so mikið áleiðis at klárt er at fara undir jørðarbeiðið. Í fyrsta lagi avgrevstur, ið m.a. skal geva betri yvirlit til víðari jørðarbeiði t.e. spreinging, grovplanering, planering vm.

Útboð hevur verið av avgrevstrinum. Kostnaðarmetingin lá millum 1,1 og 1,4 mió. kr.

2 arbeiðstakarar vóru bodnir at bjóða. Lisitatión var 3. mai 2016 kl. 14.

Tilboðini vóru soljóðandi:

| | |
|---|---|
| P/F Articon | kr. 1.294.147 |
| H. V. Lützen | kr. 1.772.448 |

Ikki íroknað MVG.

Farast kann í holt við arbeiðið innan umleið 3 vikur.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin mæla nevndini til at taka undir við at gera sáttmála við lægsta tilboðsgeva og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina. Sáttmálin væntast klárur til viðgerðina í figgjarnevndini.

**Mentamálanevndin 4. mai 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Halla Samuelsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av hesum málið.

**Fíggjarnevndin 11. maj 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndni og beina málið í býráðið.

***Býráðsfundur 19. mai 2016: Einmælt samtykt.***

*Ískoyti*
*Á karminum eru fyri 2016 játtaðar 30,8 mio.kr. á stovnsnr. 4174 – Nýbygging skúlar (íløgur). Projekteringin av skúlanu er nú gott ígongd, umframt at jørðarbeiðið er um at fara í gongd. Tørvur er á áleið upphæddini til virksemi í ár.*

*Tilmæli*
*Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla at játta 30,8 mio.kr. á projektkonto L41012.*

**Fíggjarnevndin 08. juni 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 16. juni 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Eftir at fyrra útbjóðingin bleiv annulerað í summar hevur bygginevndin saman við Ráðgevarasamtakinum Eind gjøgnumgingið skipanaruppskotið vm. og gjørt ávísar tillagingar. Yvirlit sæst í hjálagda skjali.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at taka tillagingarnar til eftirtektar.

**Mentamálanevndin 17. oktober 2016:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
20. oktober 2016 kl. 14 var licitatión uppá bygging av nýggjum skúlabygningi til Skúlan á Fløtum.

Hesi feløg/samtøk vóru boðin at bjóða í innbodnari licitatión og teirra høvuðsboð eru:

| | |
|---|---|
| P/F MT Højgaard Føroyar við undirarbeiðstakarum | - 287.151.814 kr. |
| P/F J&K Petersen, Sp/f Húsavarðatænastan og Sp/f TG Verk við undirarbeiðstakarum | - 298.955.524 kr. |

(eisini nevnt: Samtakið í Havn)
P/F Articon og Sp/f Búsetur við undirarbeiðstakarum - 267.809.320 kr.

Høvuðsráðgevin Samtakið Eind Í/F hevur, eftir innanhýsis viðgerð og gjøgnumgongd av tilboðunum, saman við umboðum fyri Tórshavnar kommunu, latið tilmæli 26. oktober 2016 viðvíkjandi hvat av samtøkunum skal fáa í boði at gera eina partalagsavtalu (fasu I) og har ætlandi raka ein targetprís, sum síðani vil innibera eina endaliga partalagsavtalu (fasu II) og ein arbeiðstøkusáttmála.

Henda tilgongdin kemur ætlandi at byrja 1. november 2016 og gongur fram til í januar 2017, tá komið ætlandi verður aftur í nevndir og býráð við einum úrsliti og tilmæli.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum hevur 26. oktober 2016 viðgjørt tilmælið frá Samtakinum Eind og umrøtt málið saman við teknisku fyrisiting. Bygginevndin tekur undir við tilmælinum frá Samtakinum Eind (sí tilmælið á nevndarportalinum).

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at fara í partalag (fasu I) við lægsta tilboðsgeva. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 27. oktober 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. oktober 2016:** Samtykt og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. oktober 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála og kostnaðarmeting verður tøkt til fundin. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at heimila umsitingini at innganga arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiði fíggjað av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Fíggjarnevndin 16. november 2016:** Tikið av skrá.

**Ískoyti**
Mett verður, at samlaði íløgutørvurin til byggingina av Skúlanum á Fløtum fíggjarárið 2017 verður umleið kr. 70 mió.

Í uppskotinum til fíggjarætlan fyri 2017 eru settar kr. 42,075 mió av til endamálið. Í hesum sambandi er fráboðað, at írestandi fíggingin til komandi fíggjarár kr. 28 mió skal játtast sum eykajáttan í inniverandi fíggjarári av løgukarmi 5175 Musikkskúlin.

Partalagssáttmáli er undirskrivaður. Umframt avgrevsturin, sum er liðugur, verður grót- og spreingiarbeiðið byrjað í ár, og byggingin av sjálvum bygninginum byrjar ætlandi í apríl 2017.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjóri mæla til at samtykkja eykajáttan kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 24. november 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta kr. 28 mió av løgukarmi 5175 Musikkskúlin til løgukontu 4176 Nýbygging skúlar L41012 Skúlin á Fløtum við teirri viðmerking, at meirinntøkurnar fyri fíggjarárið 2016 skulu játtast til arbeiðið at byggja Musikkskúlan og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 29. november 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið at viðgera tvær ferðir.

**Býráðsfundur 30. november 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Við atliti til tryggja javna gongd og framhald í verkætlanini, er nú klárt at innganga arbeiðstakarasáttmála um víðari jørðarbeiðið. Avgrevsturin er framdur og byggipláss-økið riggað til, herundir við skúrum til verkætlanarsamskipanina vm.

Næsta stigið, sum hesin arbeiðstøkusáttmálin fevnir um, er spreinging og planering. Uppskot til sáttmála er gjørt, kostnaðarmetingin fyri arbeiðið er kr. 7.386.512 u/mvg. Harumframt koma útreiðslur til byggipláss uml. kr. 500.000 og mvg, samlaður kostnaður umleið kr 8.500.000. Sáttmálin um víðari jørðarbeiðið er við lægsta tilboðsgeva frá lisitatiónini Samtakið Articon - Búsetur. Fígging er tøk á játtanini til Skúlan á Fløtum.

Bygginevndin fyri Skúlan á Fløtum viðger sáttmálan týsdagin áðrenn fundin í mentamálanevndini.

Sáttmáli um størra partin av høvuðsarbeiðstøkuni (byggingin) verður klárur tá fasa 1 í partalagnum verður liðug í fyrsta ársfjórðingi í 2017.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararktitekurin og mentamálaleiðarin mæla

mentamálanevndini til at heimila umsitingini at inngangа arbeiðstakarasáttmála við Samtakið Articon – Búsetur um jørðarbeiðið og játta kr. 8.500.000 av kontu 4176 Nýggir skúlar L41012 Skúlin á Fløtum.

**Mentamálanevndin 6. desember 2016:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 07. december 2016:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 15. desember 2016:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Ì sambandi við, at byggiverkætlanin verður skipað í partalagssamstarvi millum Tórshavnar kommunu, Samtakið Eind Í/F og Samtakið Articon – Búsetur Í/F, skal sbrt. partalagsskipanini skipast ein stýrisbólkur við umboðum fyri Tórshavnar kommunu og bæði samtøkini.

Bygginevndin, sum hevur virkað higartil, gongur tí út, men mælt verður til, at býráðið velur umboð í stýrisbólkin.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla býráðnum til at velja umboð í stýrisbólkin í partalagnum.

**Býráðsfundur 26. januar 2017:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 02. mars 2017:** Vald vóru Gunnvør Balle, Jákup Dam, Helena Dam á Neystabø og Heðin Mortensen.

**Ískoyti:**
Partalagsavtala varð undirskrivað 17. november 2016. Síðani hava partarnir arbeitt við at gjøgnumganga og menna verkætlanina sbrt. ætlanini í partalagsavtaluni, herundir at fáa sent myndugleikaprojekt til góðkenning hjá byggivaldinum. Hetta var gjørt fyrst í apríl og er endaligt svar væntandi um stutta tíð.

Eisini er arbeitt við at fáa ásett endaliga byggikostnaðin. Í tilgongdini eru fleiri tilagingar gjørdar við atliti til at náa ein nøktandi targetkostna samsvarandi upprunaligu ætlanini, sí hjálagt skjal. Eisini sæst at, í tilgongdini eru nakrar postitiónir, sum av misgáum ikki vóru við í upprunaliga útboðstilfarinum/nøgdarlistunum, og sum nú eru roknaðar við.

Targetprísurin er nú ásettur til kr. 247.000.000 við avhending í einum byggistigi 1. apríl 2020, tó so, at møguliga vilja partar av verkætlanini kunna verða liðug áðrenn, men er ov tíðiliga at áseta tað enn. Arbeiðið kann byrja at kalla beinanvegin. Verandi arbeiðstøka við planering er um at vera liðug.

Nú er klárt at taka støðu til um farast skal víðari í partalagsfasu 2 og gera høvuðsarbeiðstøkusáttmála.

Kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m. umframt mvg) er nú kr. 383.073.750.

Higartil eru játtaðar kr. 101.752.000 til verkætlanina, harav kr. 42.075.000 er standa í løgukarmi 4176 Nýbygging skúlar fyri fíggjarárið 2017, og aðrar kr. 37.809.000 standa sum minninýtsla fyri 2016 og tí skulu framflytast í sambandi við ársroknskapin hjá kommununi.

Írestandi fíggjartørvur avrundað er sostatt kr. 281.323.000, ið skulu játtast yvir fíggjarárini 2018, 2019 og 2020. Mett verður, at fíggjartørvurin fyri inniverandi ár er kr. 61.015.000, tvs., at í inniverandi fíggjarárið er kr. 18.869.000 sett ov nógv av, og kann løgukarmurin tí lækkast fyri inniverandi fíggjarár.

Samlaði fíggjartørvurin fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður sambært hesum tí kr. 300.192.000. býtt soleiðis samsvarandi væntaðum útreiðslutørvi fyri hesi ár: í 2018 kr. 110.175.000, í 2019 kr. 127.383.000, og í 2020 kr. 62.634.000.

Hjáløgd málinum er:
a) frágreiðing um fyriliggjandi forprojekt til góðkenningar
b) uppskot til høvuðsarbeiðstøkusáttmála við Samtakið Articon-Búsetur Í/F
c) kostnaðaryvirlit

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, býararkitekturin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at góðkenna hjálagda forprojekt og høvuðsarbeiðstøkusáttmála og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina, har samlaði kostnaðarkarmurin fyri bygingina er kr. 383.073.750.

Til tess mæla trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin til at játta fyri fíggjarárið 2017 kr. 23.206.000 á løgukarminum 4176 Nýbygging skúlar út á løgukontu L41012 Skúlin á Fløtum, og flyta minninýtslu á somu løgukontu fyri fíggjarárið 2016 kr. 37.809.000, og at írestandi upphæddin kr. 300.192.000 fyri árini 2018, 2019 og 2020 verður játtað samsvarandi býtinum omanfyri, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 24. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 26. apríl 2017:** Samtykt at taka undir við mentamálanevdini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. apríl 2017:** Einmælt samtykt.

Fyri atkvøddu: Annika Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam, Turið Horn, Sjúrður Olsen, Bergun Kass, Annfinn Brekkstein, Helena Dam á Neystabø, Bjørghild Djurhuus, Tróndur Sigurðsson, Heðin Mortensen og Gunvør Balle.

**Ískoyti**:
Á løgukarminum L4176 Nýbygging skúlar fyri 2018 eru játtaðar 100 mio.kr til verkætlanina. Støðug gongd er á verkætlanini og væntandi verður tørvur á á leið 91 mio. kr til arbeiðstakarar og ráðgevar. Hartil koma ymiskar útreiðslur hjá byggiharranum. Samstundis er við 1 viðgerð samtykt í býráðnum framflytning av minnunýtsluni í 2017 á 6.541 tkr. (sí mál

18/01521 – Framflytingar fyri árið 2017). Mett verður hóskandi at hava eitt ávíst fíggjarligt rásarúm fyri um verkætlanin kemur at vinna inn á settu tíðarætlanina.

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at játta 92 mio. kr. av løgukarminum 4176 á løgukonto L41012 - Skúlin á Fløtum. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 14. mai 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 24. mai 2018:** Einmælt samtykt**.**

**Ískoyti**:
Fíggjarnevndin biður um, at fáa málið á skrá til kunningar.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2018:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**:
Víst verður til skjal nr. 14/03408-83.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, virkandi tekniski stjórin, deildarleiðari á verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at samtykkja at heimila umsitingini at fara undir samráðingar við arbeiðstakara og ráðgeva um dagføring av partalagsavtaluni at leggja fyri aftur í nevndunum til góðkenningar. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. juni 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Samtykt at taka undir við Mentamálanevndini.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur havt samráðingar við partarnar í partalagssamstarvinum t.e. Í/F Articon-Búsetur og Í/F Eind og er komin til eina semju. Sí hjálagt ískoyti til partalagsavtaluna (dagfest 17. November 2016) og ískoyti til arbeiðstakarasáttmálan (dagfestur 10. Mai 2017).

Ískoytini innibera at TK hækkar upphæddina til ókendu puljuna við 5 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til at lækka targetkostnaðin frá 248 mio.kr. til 247 mio.kr., umframt setur 1 mio.kr. av til tilkeyp í sambandi við eina betri takloysn, soleiðis at endamálið við at gera takið atkomiligt og brúkiligt kann vera rokkið.

Hesar broytingarnar innibera, at kostnaðarkarmurin fyri alla verkætlanina (HVÚ, ókent, prís- og lønarvøkstur, heildarráðgeving, eftirlit, listprýði v.m., umframt kommunalt MVG) fer úr 383.073.750 til kr. 390.511.250. Væntandi hava hesar broytingar ikki samanlagt fíggjarligar avleiðingar í 2018 og helst heldur ikki í 2019 og eisini tengt at, hvussu umfatandi brúkið av tí

ókenda verður framyvir. Í sambandi við viðgerðina av fíggjaræltanini í heyst verður nærri nágreina um periodisering av játtanini til verkætlanina í 2019 og 2020.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin fyri verkætlanardeildini og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at taka undir við ískoytinum til partalagsavtaluna fyri Skúlan á Fløtum og at hækka samlaða kostnaðarkarmin fyri verkætlanina til kr. 390.511.250. Málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 02. juli 2018:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 04. juli 2018:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juli 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Helena Dam á Neystsbø hevur boðað frá, at hon ynskir at taka seg úr stýrisbólkinum fyri "Nýggjur skúli í vesturbýnum".

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Tikið til eftirtektar at Helena Dam á Neystabø tekur seg úr stýrisbólkinum og at Bjørghild Djurhuus tekur sætið í stýrisbólkinum.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 769<br>Formansins merki: |

# 197/18 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2018

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.02.2018 | 60/18 | 18/00018-1 |
| 2 Býráðsfundur | 01.03.2018 | 45/18 | 18/00018-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.03.2018 | 87/18 | 18/00018-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 18.04.2018 | 125/18 | 18/00018-1 |
| 5 Býráðsfundur | 24.04.2018 | 99/18 | 18/00018-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 18.05.2018 | 158/18 | 18/00018-1 |
| 7 Býráðsfundur | 24.05.2018 | 134/18 | 18/00018-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 20.06.2018 | 212/18 | 18/00018-1 |
| 9 Býráðsfundur | 20.06.2018 | 167/18 | 18/00018-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 22.08.2018 | 239/18 | 18/00018-1 |
| 11 Býráðsfundur | 30.08.2018 | 197/18 | 18/00018-1 |

**Upprunin til málið:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum – samandráttur**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Møgulig frávik/lættar frá ásetingum**

**Umhvørvisárin**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingar avleiðingar** | | | | |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>30. august 2018 | Blað nr.: 770<br><br>Formansins merki: |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **Unhvørvis avleiðingar** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Ískoyti:** Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 21. februar 2018:** Framlagt og góðkent

**Býráðsfundur 01. mars 2018:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 14. mars 2018:** Útsett.

**Ískoyti:**
Roknskapur fyri februar og mars verður lagdir fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. apríl 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. mai 2018:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundur 24. mai 2018**: Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri mai verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 20. juni 2018:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti**:
Roknskapurin fyri juni verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**Býráðsfundur 30. august 2018:** Framlagt og góðkent**.**

**FUNDURIN LOKIN KL. 19.45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Annika Jacobina Olsen | Helena á Dam Neystabø | Tróndur Sigurðsson |
| Halla Samuelsen | Bogi Andreasen | Jákup Dam |
| Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal | Bjørghild Djurhuus | Gunvør Balle |
| Turið Horn | Bergun Kass | Heðin Mortensen |
| | Kaj Leo Holm Johannesen | |